Nr. 5 • Apríl 2010

# MIÐ & MAGN

Føroya Skipara- og Navigatørfelag & Maskinmeistarafelagið



**ÚTGEVARI**
Maskinmeistarafelagið og Føroya Skipara- og Navigatørfelag geva MIÐ & MAGN út í felag.
Blaðið verður sent limunum.
4 útgávur eru um árið.

**BLAÐNEVND**
Eyðstein Djurhuus (ábyrgd).
Regin Nónstein.
Páll Hansen.
Jóan Petur Patursson.

**MASKINMEISTARAFELAGIÐ**
Grønlandsvegur 58
Postboks 3238
110 Tórshavn
Telefon 31 47 18
Teldupostur: mf@mf.fo

**FØROYA SKIPARA- OG NAVIGATØRFELAG**
Jekaragøta 10
Postboks 248
110 Tórshavn
Telefon: 31 69 73
Teldupostur: fsn@fsn.fo

**BLAÐHALD**
Tey, sum ynskja at halda MIÐ & MAGN kunnu boða frá hesum í teldupost til:
bladhald@midogmagn.fo
Haldara gjaldið er 200,- kr.
um árið; t.v.s. 4 bløð.

**ENDURGEVING**
Tað er loyvt at endurgeva tekst úr MIÐ & MAGN, tá keldan verður upplýst.
MIÐ & MAGN kann heintast í PDF á heimasíðunum hjá feløgunum:
www.mf.fo
www.fsn.fo

**UMSITING**
Sp/fMEDIA
info@midogmagn.fo

**UMBRÓTING, PRENT OG LIÐUGTGERÐ**
Føroyaprent | www.foroyaprent.fo

UPPLAG: 2.000


# At stuðla ella ikki stuðla



Nú er aftur nógv orðaskifti, um tað er rætt at stuðla okkara fiskivinnu ella ikki. Fyri okkara limir eru tað inntøkutrygdin og sjómannafrádrátturin, sum hava týdning. Okkara løgmaður hevur sagt, at hetta eru stukturellir skeivleikar, sum forða fyri einari lønsamari vinnu. Eisini eru uppskot frammi um, at áleggja tilfeingisgjald, eykaskatt og oljuavgjald á okkara hart kroysta fiskiskipa flota. Higartil er onki komið fram um, hvussu hesi átøk skulu gagna vinnuni. Vit eru ikki vitandi um nakra vinnu ella samfelag, sum er komið fyri seg við at áleggja eyka byrðar og skattir.

Inntøkutrygdin verður ásett út frá tímalønini hjá arbeiðarum og verður bert latin fyri tíðina ein er umborð. So tað má verða øllum greitt at ongin verður ríkur av minstuløn. Skipsyvirmenn fáa ikki hægri inntøkutrygd enn dekkarar. Samfelagið hevur eisini áhuga í, at varðveita ein fjøltáttaðan fiskiskipaflota og eina javna rávørutilgongd til føroysku fiskavirkini. Ein tanki hevur verið at reiðarin skal gjalda inntøkutrygdina. Trupulleikin við hesum er bert, at tað er júst tann veikasti parturin av flotanum, sum hevur størsta tørvin á inntøkutrygdini, nú fiskiskapur og fiskaprísur er á so løgum støði.

Nýtslan til inntøkutrygd var meir enn 40 mill í 2009. Fleiri siga hetta vera eitt stórt problem fyri landskassan. Men hetta er bert eitt symptom uppá eitt nógv størri problem, nevniliga tað stóru katastofu, sum stórur partur av okkara flota hevur verið fyri. Línuskipini klára ikki fleiri ár sum 2009. Útgjaldið til minstuløn og dagstudning, fer at minka heilt av sær sjálvum. Annaðhvørt við, at avreiðingarvirði hækkar ella við, at skipini gevast -

Sjómanna frádrátturin hevur nú virkað í nøkur ár, hann er gamaní lækkaður tvær ferðir. Men hann er framvegis 14 % av í mesta lagi 470 tús. Øll okkara grannalond hava serstaka skattaskipan fyri sjómenn og fiskimenn. Vit hava ikki frætt um, at hesar skulu avtakast ella lækkast. Heldur hoyra vit um, at neyðugt er at økja um áhugan fyri sjóvinnu, millum annað við serligum skattaskipanum.

Ì FAS skipanini verða sjómenn nú skattaðir við 35 % flatrate, DIS netto inntøkur verða ikki skattaðar. Sjómenn sum sigla við millum øðrum norskum skipum verða skattaðir eftir § 25 B í skattalógini, har skatturin er umleið 30 %. Tí kann tað virka eitt sindur meiningsleyst at bert teir, sum eru við fiskiskipum, nú skulu missa sína serskipan. Hetta er tann serskipanin, sum gevur minst í skattalætta, og gevur mest til tær lægru lønirnar.

Ein av grundgevingunum fyri sjómansfrádráttinum var at forða fyri fráflyting. Tað er onki sum forðar fyri, at føroyingar búsitandi í útlondum, kunnu sigla við føroyskum fiskiskipum. Vit mugu skipa so fyri, at tað loysir seg, at búgva her á landi, meðan ein siglir við okkara skipum. Ein avtøka av sjómansfrádráttinum kann lættliga gerast ein útreiðsla, heldur enn inntøka fyri landið.

Flestu politikarar siga seg, at vera ímóti vinnustudningi. Men um vit hyggja eitt sindur nærri uppá tingini so er veruleikin ein annar. Í Ólavsøkupakkanum verður skotið upp, at allur peningurin sum liggur í Húslánsgrunninum skal brúkast til bílig lán til bjálving og umbyggingar av sethúsum. Er hetta ikki stuðul til byggivinnuna ?. Íverksetan og vinnuframatiltøk fáa alsamt meira stuðul av øllum handa slagi. Tá talan er um gransking, so er onki óført hvussu væl teir vilja stuðla.

Nei, teir hava onki ímóti studningi, hann skal bara latast aðrar vegir.

*Vegna Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Maskinmeistarafelagið*

*Eyðstein Djurhuus ábyrgdarblaðstjóri*

# Innihaldsyvirlit





| | |
|---|---|
| Myrk skýggj yvir Íslandi | 4 |
| Handilsflotin hvarv | 6 |
| Íðin kjakklubbi | 8 |
| Betri samstarv í millum granskarar og fiskimenn | 10 |
| Æti og fiskur á Landgrunninum | 14 |
| Aðalfundur í Maskinmeistarafelagnum | 17 |
| Hans Johannis á Brúgv gestarøðari | 26 |
| Tíðindi frá Føroya Skipara- og Navigatørfelag | 30 |
| Tíðindi frá Maskinmeistarafelagnum | 33 |
| Stutt um TYR Shipping Management | 34 |
| Navigatørurin í brennideplinum | 35 |
| Stórir møguleikar í frálandavinnuni | 36 |
| Pelagiska kompleksið | 38 |
| MSC-góðkenningin av norðhavssild | 39 |










# Myrk skýggj yvir Íslandi

Á fjarleiðum norðanfyri, har aldurnar verða upp í 25 metrar høgar, tá ið Atlantshavið ger um seg – har stríðist íslendski sjógarpurin dag um dag við at halda skútuni siglandi – bókstavliga úti á havinum, men eisini við at bera so í band, at Ísland hórar undan sum sjófarandi tjóð; tí tað er bara gingið stútt aftur á hond við landsins handilsflota, frá at telja meiri enn fimmti farmaskip í sjeytiárunum til í dag ikki at telja meiri enn ellivu og av teimum bara fýra, ið burturav eru mannað við íslendingum. Og nú ger kreppan alt uppaftur verri, tí hon setir djúp spor í alt íslendska samfelagið.

## Einki handilsskip undir íslendskum flaggi

Skal sigast sum er, eru eingi serlig útlit, sigur Ægir Steinn Sveinþórsson, næstformaður í íslendska skipara- og fiskimannafelagnum (FFSI) og heldur soleiðis fram:

Hetta er eisini galdandi fyri íslendska handilsflotan - hann er at kalla ikki til. Satt at siga, so er ikki eitt einasta handilsskip eftir undir íslendskum flaggi. Antin sigla tey undir hentleikaflaggi, ella eisini hava tey flaggað út undir Altjóða føroysku skipaskrásetingina. Tað sæst eisini aftur í limalista okkara. Av teimum um leið 1.000 virknu skiparunum í felagnum starvast bert 55 í handilsflotanum, meðan 27 starvast í bjargingartænastuni. Restin – sum ikki telur stórt meiri enn 900 – siglir við fiskiskipum.

## Myrk skýggj

Blýtung skýggj hanga lágt yvir Reykjavík henda ráliga oktoberdagin, tá ið næstformaðurin í FFSI er komin við okkum eitt legg oman á havnarøkið. Her eru røð av tómum bingjum, stórir gaffiltrukkar standa fyri einki, og nakrir vøruhúsnýbygningar eru til sølu fyri lítið og lætt. Satt er tað, at ein krani lossar eitt bingjuskip, men virksemið er langt burtur frá tí, ið plagdi at vera. Í løtuni fara bingjuskipini fullfermd úr Íslandi, men koma aftur hálvtóm, tí vegna kreppuna er íslendski innflutningurin kavaður.

## Ikki longur so virknir í NNC

Av tí at vit hava ógvuliga fá handilsskip eftir, eru vit ikki longur serliga virknir á norðurlendsku skipararáðstevnuni ("the Nordic Navigator Congress" – stytt: NNC), tí tað er mest handilsflotin, sum er á fundarskránni. Á seinasta fundinum, eg var á í Århus (oktober 2009), var eitt av høvuðsevnunum sjórán, ið, sum tú veitst, er ein ræðulig plága hjá allari altjóða skipaferðslu. Men Ísland hevur ikki longur nøkur skip í vinnu úti í heimi, so mark er fyri, hvussu stór hjálp kann fáast frá okkum í hasum serliga málinum.

Hóast íslendsku luttakararnir ikki eru virknir, men óvirknir luttakarar, heldur Ægir Sveinþórsson kortini, at tað er umráðandi hjá teimum at vera partur av NNC, tí – sum hann ger vart við – tað fer ikki at bera til, at Ísland verður uppaftur meiri avbyrgt, enn tað longu er.




## Lurta eftir øðrum

Tað er umráðandi, at vit eru har og lurta eftir royndunum hjá øðrum londum, eitt nú tá ið tað kemur til trygd – og, sum vit øll vita, er tað galdandi, antin tú hevur stóran ella lítlan handilsflota. Og so eitt afturat: vit kenna hvønn annan persónliga og kunna tríva eftir telefonini, um okkum tørvar hjálp at greiða onkra fløkju. Ein av limum okkara sigldi sum navigatørur við einum norskum handilsskipi. Nakað seinni fór hann í land, men fekk ikki peningin, hann átti á. Maðurin ringdi fleiri ferðir til reiðaríið, men hvørki eitt ella annað hendi. So fór eg í fartelefonina, ringdi til norska samstarvsfelaga mín og bað hann hjálpa. Dagin eftir hevði reiðaríið flutt navigatør okkara peningin.

## Ljós í myrkrinum

Tá ið tú koyrir runt á havnarøkinum í Reykjavík, verður tú bilsin at síggja, hvussu stórt tað er. Verður alt roknað uppí, er íslendski høvuðsstaðurin spjaddur um so nógvar fermetrar, at út frá teimum rúgvar hann tvær ferðir so nógv upp sum París – hóast ikki meiri enn 300.000 íbúgvar eru í Íslandi. Tá ið vit nærkast bingjustøðini hjá Eimskipi, tykist eins og ljósriva er um at leita sær veg niður úr myrku skadduni.

## Ægir Steinn Sveinþórsson

Tað er næstan myndaligt, ikki so? heldur Ægir Steinn Sveinþórsson fyri. Kreppan hevur kanska sett djúp spor í alt samfelagið, men onkustaðni er ljós í myrkrinum. Eg hugsi um allar teir limir okkara, sum starvast í fiskivinnuni. Satt at siga gongur væl við fiskivinnuni – kreppa ella eingin kreppa. Tað er á nærleiðum runt Ísland, at gull okkara er fjalt – tað er havsins ríkidømi, sum fer at draga okkum ígjøgnum kreppuna í øllum góðum. Enn ber til hjá okkum at flyta út fisk og fáa gott, sterkt gjaldoyra fyri tað, vit framleiða, og tað tryggjar nógvum arbeiði. Vit síggja eisini, at navigatørar okkara hava betri og betri hug at fara umborð á fiskiskip; her fært tú framvegis heilt góða løn fyri tað, tú gert. Ikki sum í øðrum vinnugreinum, har ið støðið er máað undan lønunum, hvørja ferð íslendska krónan er niðurskrivað.

## Nógv søkja inn á sjómansskúlan

At støðan hjá íslendskum navigatørum kortini ikki er so ring, sæst av tí óvanliga stóra talinum á teimum, ið søkja inn á sjómansskúlan í Reykjavík. Satt at siga vóru so nógv, ið søktu í ár, at rúm var ikki fyri øllum. Ægir er onga løtu í iva um, hví:

Eg haldi, at nógv ungfólk hava sannað, at tað loysir seg ikki longur at spæla við pappírspening. Fyri bert nøkrum fáum árum síðani vildu øll ungfólk sleppa at arbeiða í einum banka ella við kunningartøkni, tí har var ovmikið av peningi at forvinna, men nú skilja øll, at hann hevði onga rót í veruleikanum. Nú stevna fólk ímóti álítandi vinnum og sostatt tryggari inntøku.

## Ampa um framtíðina

So næstformaðurin í FFSÍ dugir væl at síggja eitt kámt ljós í myrkrinum, tá ið talan er um framhaldandi arbeiði í fiskivinnuni. Harafturímóti væntar hann, at um tíggju ár – tjúgu í mesta lagi – vera ikki longur nakrir íslendskir navigatørar umborð á skipum, sum íslendskir reiðarar eiga.

Í løtuni nærkast miðalaldurin í íslendska handilsflotanum teimum seksti. Tað er akkurát so, at vit sleppa undan at gera eina lyftu upp á brúnna, so navigatørurin, ið er væl við aldur, vinnur upp á hana, heldur Ægir Steinn Sveinþórsson fyri við grimum skemti. Tað hevur við sær, at teir ungu navigatørarnar ikki sleppa til sjós at fáa ta siglingstíðina, ið krevst. Tú fært at kalla ongan kjans sum annar stýrimaður. So hvørt sum tey ungu varnast, at tey ikki sleppa áleiðis á sjómansyrkisleiðini, sleppa tey sjólívinum – og tá koma tey ongantíð aftur.

Men sum Sveinþórsson vísir á, hetta vandamálið er sjálvandi ikki bara í Íslandi. Tað er av sonnum felagsvandamál hjá Norðurlondum, og kanska átti spurningurin at verið settir ovast á dagsskránna til komandi fundirnar á norðurlendsku skipararáðstevnunum.



*Ægir Steinn Sveinþórsson, næstformaður í íslendska skipara- og fiskimannafelagnum (FFSI)*

# Handilsflotin hvarv




Størsta skipafelagið í Íslandi, Eimskip, kallar vanliga skip síni upp eftir íslendskum fossum, soleiðis eisini bingjuskipið ”Dettifoss”, sum er beint undir 15.000 GRT. Tað liggur við bryggju í Reykjavík og verður lossað, tí tað skal vera klárt at sigla morgunin eftir. Meginparturin av farminum er frystur fiskur, sum verður sendur til Evropu, men aluminium er ein onnur íslendsk handilsvøra, so aluminiumsvirkið við Reyðarfjørð á íslendsku eysturstrondini verður næsta havnin. Av megindekkinum sást tú trampa tær veg sjey dekk longri upp, ætlar tú tær at finna skiparan, sum eitur Matthias Matthiasson.

## Øll manningin er íslendsk

Hesi nógvu seinastu árini havi eg siglt í regluligari tænastu ímillum Ísland og fleiri evropiskar havnir, teirra millum danskar – tað bøtir heilt nógv um málið, sigur Matthias Matthiasson og leggur afturat:

Mær dámar ógvuliga væl at føra hetta skipið, ikki minst tí øll manningin er íslendsk. Tað lættir um mangt í gerandisdegnum, og tað er eisini stuttligari at hava landsmenn at vera saman við, tá ið tú endaliga hevur eina frílotu. Reiðaríið kundi helst sum einki funnið bíligari arbeiðsfólk, men valla nakað, sum fær eins nógv á skaftið. Hygg, hvussu væl manningin hjá mær røkir skipið – tað er ikki meiri, enn tú sært, at Dettifoss er fimtan ára gamalt skip, sigur skiparin og kveitir væl nøgdur út á dekkið. Sami sigi eg, tá ið tað kemur til at gera klárt at sigla – tá kann eg líta 100% á manningina hjá mær. Men – leggur hann afturat og verður álvarssamur – eitt ørkymlar meg stórliga, tað skal eg vísa tær.

## Navigatørar væl við aldur

Matthias Matthiasson tekur messuskrásetingina fram og letur fremstafingur ferðast oman eftir teiginum, har iðpersónssamleikatølinihjámanningini standa. Her sæst týðiliga, at dastið av fólkinum umborð er borið í heim seint í fjøruti-árunum ella í fimmtiárunum. Og tá ið hann ger hetta, vísir hann á ein av megintrupulleikunum í handilsflotanum: Her er eingin útskifting, og tí sleppa teir ungu yvirmenninir ikki framat. Yngsti navigatørurin umborð er 47.

Skal sigast sum er, eri eg ov gamal at vera her, sigur 66-ára gamli skiparin. Men tá ið tíðirnar eru ótryggar og eftirlønarskipanin ikki er nakað serlig, torir tú illa at gevast. Satt at siga vildi eg ynskt, at yrkisfelag okkara gjørdi meiri burtur úr at fingið til vega eina betri eftirlønarskipan, so tú óttaleysur kundi farið frá 60 ella 62 ára gamalur. Men næsta ár, tá ið eg verði 67, er heilt vist, at eg fari frá, sigur Matthias Matthiasson avgjørdur.

## 12 havnir í 11 dagar

Við Dettifossi eru 13 mans Á brúnni eru skiparin og tveir stýrimenn, á dekkinum ein bátsmaður og fýra dugnaligir matrósar. Í maskinrúminum eru maskinmeistarin og fyrsti maskinmaður, ein elektrikari og ein motorpassari. At enda eru íslendsku sjómenninir so hepnir, at teir hava ein kokk umborð.

Skipið siglir regluliga millum Ísland, Føroyar, Holland, Noreg, Svøríki og Danmark. Og skip og manning eru undir støðugum trýsti, tí leggjast skal at í 10 ella 12 havnum í 11 dagar.

Tá ið eg kom umborð í 2000, var skipanin tann, at vit vóru umborð í fýra vikur og heima í tvær. Men tá ið eg hevði givið mær gjølla far um farleiðina við nógvu torføru innsiglingunum og innflutningshavnunum – fyri ikki at tala um ringa sjógvin, vit sigla í – noyddist eg at siga við reiðaríið, at tvær rundferðir við ongum skáa var ov møðsamt. Ein ferð átti at verið nóg mikið – tá trongdi tú til at sleppa heim at hvíla, so tú kundi vera væl fyri til næstu ferðina. So við og við vórðu samstarvsfelagar mínir sjúkir, og tískil fóru vit undir 1/1-skipanina, greiðir Matthiasson frá og heldur fram við at siga, at soleiðis varð reiaríið eisini ført fyri at seta fleiri yvirmenn í starv, hóast færri skip vóru rikin.

Tá ið siglingarskeið skiparans á Dettifossi væntandi verður at enda komið næsta ár, kann hann líta aftur á 49 ára tænastu á reiðarínum, síðani hann byrjaði sum dugnaligur matrósur umborð á Gullfossi í 1961 og aftan á sjómansskúlan varð triði stýrimaður á sama skipi. Tá ið reiðaríið var í hæddini, hevði Eimskip ikki færri enn 24 skip – nú eru bara 8 eftir.

## Altjóða skráseting farin um koll

Nú um dagarnar sigla vit undir Antiguiskum flaggi, og tað er sjálvandi harmiligt ikki at kunna flagga við egnum flaggi. Orsøkin er hon, at royndin at skipa fyri íslendskari altjóða skipaskráseting (IIS – Iceland International Ships Register) var fullkomiliga miseydnað. Størsta yrkisfelagið í Íslandi helt, at teimum, ið starvaðust umborð, mátti tryggjast íslendska minstuløn.Eg haldi, at í hasum fóru teir fullkomiliga skeivir, tað bøtti heldur ikki um, at trongskygdir politikarar eisini settu seg upp ímóti skrásetingini við teirri grund, at reiðaríini longu vunnu nóg mikið. Í dag eru framvegis eingi skip, ið eru skrásett har, sigur skiparin uppgevandi og yppir øksl:

Tað er eisini spell, at um eini tíggju ella tjúgu ár vera kanska eingir lærdir og royndir íslendskir yvirmenn eftir í handilsflota okkara. Tað er vissuliga ikki gott hjá einari oyggjatjóð.

## Gamal sjófarasiður farin

Í fleiri ættarlið hava Matthiassynirnir verið sjáfararar. Pápi hansara sigldi til dømis sum trolaramaður í sama reiðaríi í 44 ár uttan íhald. Men nú slitnar ketan, tí eingi av børnunum hjá Mathiasson hava valt at ganga í fótaspor faðirsins:

Ei heldur havi eg eggjað teimum til, tí framtíðarmøguleikarnir á sjónum eru ikki ov góðir. Men sonur mín er útbúgvin innan vørugreiðslu á sjógvi og er leiðari á ”Sølu og Tænastu” har yviri, sigur 66 ára gamli skiparin og peikar yvir á høvuðsstøðina hja Eimskipum, áðrenn hann brosandi leggur afturat: so vit hava ikki tikið okkum heilt burtur úr farmaflutningsvirksemi.




*Matthias Matthiasson, skipari*

# Íðin kjakklubbi

Hygg, her eru nakrir okkara farnir útferð til Vestmannaoyggjar, sigur Guðlaugur Gíslason og blaðar í fotoalbumminum – hetta er heilt vist Mols Sørensen, formaðurin hjá donsku navigatørunum í nógv ár.

Tað er eingin minni enn íslendski navigatør - Nestorurin, sum er stokkin inn á gólvið hjá "Félagi Skipstjórnarmanna", íslendska yrkisfelaginum hjá navigatørum. Í sínari tíð eggjaði hann støðufastur íslendingum at fara upp í norðurlendsku strýrimannaráðstevnuna (Nordic Navigator Congress).

## Lyndi til at byrgja seg av

Eg haldi, at vit hava lyndi til at byrgja okkum av her í Norðuratlantshavi. Men umráðandi er at hava høvi til at læra av royndum hjá øðrum. Í Íslandi vóru navigatørar í nógv ár býttir sundur í fleiri ymisk yrkisfeløg – landafrøðiliga eins væl og sundur í stýrimenn og skiparar. Stýrimenninir vóru í meiriluta, so skipararnir óttaðust helst fyri, at teir fóru at vera í minniluta, um teir gingu saman í eitt felag. Men tá ið tað kom til tað, kundu hini Norðurlondini siga okkum, at tílíkt samstarv sambært teirra royndum fór at gagna báðum pørtum.

So tíðliga sum í 1952 stóð Íslandi í boði at gerast limur í NNC, men um tað mundið mettu tey ymisku stýrimansfeløgini ikki, at neyðugt var at verða partur av norðurlenska samstarvinum. Ikki fyrr enn fyrst í áttatiárunum kveiktist áhugin aftur, og um heystið í 1981 fekk íslendska navigatørfelagið, sum var yrkisfelagið hjá navigatørunum, ið sigldu við handilsskipum, fullan limaskap í NNC. Árið eftir varð summarfundurin hildin í Íslandi.



*Høgrumegin formaðurin í íslendska skipara- og fiskimannafelagnum (FFSI)*

## Virkin NNC-samtykt

Síðani tá hava vit fingið nógv burtur úr limaskapinum, ger Gíslason vart við. Ein av stóru trupulleikunum í 80'árunum vóru tey mongu undantaksloyvini, sum fiskiflotin fekk. Undantaksloyvi vórðu veitt, sum best bar til, uttan nakað kravt prógv, og vit hildu tað vera at vanvirða trygdina skammleyst. Á NNC-fundinum í 1984 var samtykt gjørd, sum var send íslendsku myndugleikunum beinleiðis. Teir tóktust taka hana í álvara; ið hvussu so er vórðu nógv færri undantaksloyvi givin eftir tað.

Sum flestu av fyrrverandi formonnunum leggur Gíslason dent á, hvussu stóran týdning persónliga netið hevur. Mangan hevur hann ringt til onkran, hann hevur samband við í hinum Norðurlondunum, til at loysa okkurt stríðsmál við ein samstarvsfelaga.

## Ikki bara ein kjakklubbi

Møguliga kann sigast um NNC, at tað er lítið annað enn ein kjakklubbi, men tá ið samanumkemur er ógvuliga týdningarmikið at frætta um, hvørjar trupulleikar onnur stríðast við – og ikki minst hvussu tey loysa teir. Soleiðis kunnu vit – ella kundu – vit fara heimaftur til teir ymisku myndugleikarnar í Íslandi og siga: Hygg her – soleiðis hava tey gjørt í Noregi ella Danmark; kundu vit ikki eisini gjørt tað?

Eftirsum íslendski handilsflotin er minkaður, hevur Ísland kanska ikki sama áhuga í at vera partur av NNC, sum fæst mest við handilsflotan. Hóast tað metir fyrrverandi formaðurin, at tað er týdningarmikið at halda seg aftur at NNC:

Ja, avgjørt, tað haldi eg heilt vist. Vit hava fingið væl burturúr gjøgnum árini, so eg vóni sanniliga, at eftirmenn mínir framhaldandi fara at vera limir í NNC, sigur Guðlaugur Gíslason.







*North Atlantic Offshore Personnel Directory (OPD) er nýggj verkætlan sum hevur til endamáls at skráseta og førleikamenna fólk í norðuratlantsøkinum, sum kunnu arbeiða í frálandavinnuni. OPD skal veita tænastur og ráðgeving til fólk, stovnar og vinnulív í frálandavinnuni og samskipa skeiðvirksemi og undirvísing. OPD skal ætlandi vera ein vitanardepil og eitt netverk fyri alla frálandavinnuna í norðuratlantsøkinum.*

**Starvið**
Tú skalt standa fyri at skráseta og ráðgeva fólki, stovnum og virkjum í frálandavinnuni. Tú skalt eisini skipa fyri skeiðum og samskipa undirvísing. Tú skalt tí hava breiðan førleika.
Ein partur av arbeiðsuppgávuni er eisini at arbeiða við viðlíkahaldsskipanum og skráseta tekniska dátu í frálandavinnuni sum ráðgevi fyri samstarvsfelagar hjá OPD.
Mesta av arbeiðinum fer fram á skrivstovu í Havn, men tú skalt vera til reiðar at ferðast í norðuratlantsøkinum – og eisini út í heim í sambandi við arbeiðsuppgávur fyri samstarvsfelagar. Hetta er einar 80 dagar úti um árið.

**Førleikakrøv**
Vit vænta, at tú ert framlig/ur, kanst arbeiða sjálvstøðugt og dugir at skapa eitt umhvørvi, ið kann nøkta tørvin hjá øllum áhugabólkum.

Tú hevur maskinmeistaraprógv ella líknandi tekniska útbúgving. Tú skalt vera vanur at brúka telduskipanir og duga væl mál – serliga norðurlendskt og enskt.

Ynskiligt er, at tú hevur royndir innan frálandavinnuna og skrivstovu og/ella leiðsluroyndir. Tú skalt hava góð samstarvsevni og hegni til taka upp nýggj sambond og byggja netverk. Umsøkjarar, ið hava royndir við viðlíkahaldsskipanum (so sum AMOS) og HR-skipanum hava fyrimun.

**Setanar- og lønartreytir**
Lønin verður ásett eftir førleika og royndum. Umsókn við prógvum, c.v. og øðrum skal sendast til dh@offshore-directory.fo ella til:

Offshore Directory
Traðabrekka 13
100 Tórshavn

Umsóknarfreistin er mánadagin 26. apríl 2010

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til
Dánial Hoydal, stjóra,
tel. +45 22942837
dh@offshore-directory.fo



# Betri samstarv í millum granskarar og fiskimenn

**Nýggi stjórin á Havstovuni hevur sett sær fyri at fáa tættari samstarv í millum fiskifrøðingarnar og tey, sum liva av fiskivinnuni, tí hann heldur, at báðir partar kunnu læra av hvørjum øðrum**



*Nýggi stjórin á Havstovuni, Eilif Gaard, sigur at seinastu árini er stovnurin mentur ómetaliga nógv og hansara mál er at menningin skal halda fram. Fremsta málið er at varðveita tað høga fakliga støðið, men hann vil eisini, at Havstovan skal verða ein natúrligur samstarvsfelagi hjá teimum, sum brúka vitanina hjá stovninum.*

Tað stóð ikki skrivað yvir vøgguni hjá Eilifi Gaard, at hann skuldi verða lívfrøðingur, tá ið hann bleiv stórur, og enn minni at hann ein vakran dag enntá skuldi sessast í stjórastólin á Havstovuni, sum er okkara fremsti rannsóknarstovnur innan stovnsmetingar og fiskiskap í víðari merking.

Hann sigur, at sum so mangan var tað mestsum av tilvild, at hann fór at lesa lívfrøði. Og tilvildin hevði eisini ein fingur við í spælinum, tá ið hann fór undir tær kanningar, sum seinni gjørdu hann til serfrøðing í gróðuri í havinum og førdi til at hann fekk til vega ómissandi vitan um sambandið í millum gróður og støddina av tí fiskameingi, sum svimur í havinum.

Eilif Gaard er føddur á Tvøroyri í 1957 og er nú 52 ára gamalur.

Tað var eisini í Trongisvági, at hann gekk í skúla og sleit sínar barnaskógvar.

Hóast tað kanska var mestsum av tilvild, at hann fór at lesa lívfrøði, er tað kortini ikki óhugsandi, at hansara áhugi fyri fakinum longu varð vaktur í barnaárunum í Trongisvági, tí har á universitetið í Odense at útbúgva seg lidnan, haðani hann tók prógv í 1986.

## Nýggj vitan um føroyskar firðir

Ímeðan hann las, birtist í honum ein serligur áhugi fyri havlívfrøði.

Tá ið lesturin nærkaðist endanum, og serritgerðin skuldi skrivast, gjørdi Eilif Gaard av at koma heimaftur til Føroya at gera neyðugu kanningarnar og at skriva.

Tá var aling við at taka seg upp av álvara í Føroyum, ikki bara laksaaling, men eisini skeljaaling.

- Í sambandi við serritgerðina fekk eg áhuga fyri at kanna møguleikarnar fyri at ala krækling á føroysku firðunum, sigur Eilif Gaard.

Hann brúkti heimstaðin, Trongisvágsfjørð, til at gera royndirnar á, og á Trongisvágsfirði, stóðust trupulleikar av eitrandi plantuæti.

Jákup Andreasen á Fiskirannsóknarstovuni, sum Havstovan tá nevndist, varð settur at fylgja við gongdini. Men tá ið hann fór í annað starv, heitti Fiskirannsóknarstovan á Eilif um at taka við eftir hann og at fylgja gongdini við tí eitrandi plantuætinum, tí vandi var fyri, at tað kundi beina fyri rættiliga fitt av laksi eftir ongari tíð.

- Hetta var mín fyrsta uppgáva fyri Fiskirannsóknarstovuna og hetta var ein verkætlan, sum vardi eitt heilt ár, sigur Eilif Gaard.

## Kreppan gav síðsta skumpið

Tá ið hann hevði skrivað serritgerðina, varð hann aftur knýttur at eini verkætlan, har endamálið var at gera meiri djúptøknar kanningar av lívfrøðini í føroyskum firðum við atliti at, hvussu nøgva aling teir toldu og annað.

Tað var ein verkætlan, sum tók fleiri ár.

- Alt hetta granskingararbeiðið gav okkum virðismikla vitan um lívfrøðina í firðunum, og hetta er vitan, sum er komin væl við, tí firðirnir verða brúktir rættiliga intensivt.

Í kjalarvørrinum á, at hesar kanningarnar vórðu lidnar seinast í áttatiárunum, vóru Føroyar so smátt við at koma í eina tilfeingiskreppu.

-Tað byrjaði við fiskaloysi, og fiskurin var rak. Tað vísti seg eisini, at tilgongdin var vánalig, og samstundis stóð illa til við nøgvum fuglasløgum.

Tí vóru nøgv tekin um, at støðan viðvíkjandi gróðrinum á landgrunninum var vánalig.

- Men hinvegin vistu vit at kalla púra onki um hesi viðurskiftini yvirhøvur. Vit vistu onki um føðiviðurskiftini í sjónum, og hvussu tey ávirka fiskastovnarnar, tí til tá hevði Fiskirannsóknarstovan mest tikist við vanligar stovnsmetingar.

Í 1989 fóru vit undir forkanningar av ymsum slagi, og árið eftir byrjaðu tær veruligu kanningarnar av plantuætinum á landgrunninum.

- Vit sóu heilt greitt, at tað var átrokandi at vita meiri um føðiviðurskiftini í sjónum.

Sostatt var djúpa kreppan um tað mundið ein beinleiðis motivatión til, at Eilif Gaard fór undir tær kanningar, ið seinni blivu til eina PhD ritgerð, sum hann vardi á lærda háskúlanum í Tromsø í 2001, og sum endaði við, at hann nú kann kalla seg doktara í lívfrøði.

- Tann vitanin, vit hava um gróðurin á landgrunninum, er øll fingin til vega í árunum eftir 1990.

- Akkurát hesi fyrstu árini, vit gjørdu kanningarnar, sóu vit stórar broytingar, tí gróðurin batnaði í stórum. Og tað var øgiliga spennandi at fylgja við, hvussu skjótt og týðiligt, at batnaði gróðurin sást aftur í batnaðum fiskiskapi.

Eilif Gaard sigur, at síðani hava tey lagt stóran dent á alsamt at menna vitanina um, hvussu gróðurin í sjónum ávirkar fiskiskapin.

- Í dag vita vit nógv meiri um hesi viðurskiftini. Høvdu vit havt hesa vitanina í kreppuni fyrst í nítiárunum, høvdu vit kunna komið út við tí boðskapinum, men tað høvdu vit ongan møguleika til tá, tí vit vistu ikki betur.

Hóast hetta er rættiliga grundleggjandi vitan, undrar tað ikki Eilif Gaard, at Fiskirannsóknarstovan ikki var farin undir slíkar kanningar fyrr.

- Fiskirannsóknarstovan var ein lítil stovnur, og hon hevur neyvan havt arbeiðsorku til meiri, enn tey gjørdu tá.

- Men síðani eru vit vorðin varug við, hvussu týðiligar broytingar eru, og hvussu lættar tær eru at staðfesta, og hvussu beinleiðis sambandið er frá gróðuri upp til fiskin.

- Hesi viðurskiftini eru nógv týðiligari á landgrunninum enn í øðrum vistskipanum, tí landgrunnurin er lítil og einsháttaður, og tað ger tað nógv lættari at fylgja gongdini neyvt.

Hinvegis broytast viðurskiftini nógv

### Stutt um Eilif

**Føddur:** 19.07 í 1957.
**1986:** Prógv í lívfrøði á universitetinum í Odense . Serliga varð dentur lagdur á lívfrøði í havinum.
**2001:** Doktari í lívfrøði á universitetinum í Tromsø. Doktararitgerðin ber heitið "Planktonsamfelagið á føroyska landgrunninum". Ritgerðin er um plantu- og djóraæti, hvørji viðurskifti í umhvørvinum ávirka framleiðslu av æti, og hvussu skiftandi framleiðsla av æti ávirkar seinnu lið í føðiketunum á landgrunnunum.
**2010:** Stjóri á Havstovuni.
Hjúnarfelagi: Jona, fødd, Lisberg, úr Hvalba, sum er kokkur.
**Børn:** Árant, 18 ár, og Trygvi, 13 ár.





> **Eilif Gaard sær fyri sær, at Havstovan framyvir skal hava gott samband við tey, sum dagliga hava havið og fiskiskap sum vinnuveg.**

frá ári til ár, men av tí, at tað er lætt at fylgja við, er lutfalsliga einfalt at staðfesta, um tað er framgongd ella afturgongd í gróðrinum, og vit vita eisini, at gongdin í gróðrinum sæst aftur í fiskiskapinum rættiliga skjótt.

- Hendan vitanin er avbera hent at hava, og hon er nú ein natúrligur partur av heildarmyndini, tá ið talan er um stovnsrøkt og um metingar um útlitini fyri framtíðina.

### Næstan komin til skorin klæði

*Hvat er tað so fyri ein stovnur, tú nú er stjóri?*

- Í mínari tíð er stovnurin mentur ómetaliga nógv, sigur Eilif Gaard.

Hann sigur, at fráfarandi stjórin, Hjalti í Jákupsstovu, hevur dugað avbera væl at menna stovnin, og hann hevur somuleiðis dugað avbera væl at motivera starvsfólkið og at skipa samstarvið.

- Í dag er sostatt ongin ivi um, at Havstovan er ein granskingarstovnur á altjóða støði.

Sostatt følir Eilif Gaard tað, sum um hann mestsum er komin til skorin klæðir, tí talan er um ein stovn, sum virkar væl og er væl skipaður.

- Mín uppgáva verður so at føra stovnin víðari og at tryggja, at menningin heldur fram.

- Ein stovnur sum hesin er ongantíð liðugur at mennast, og endamálið er sjálvandi, at vitan skal alla tíðina leggjast afturat.

Eilif Gaard sigur, at álítandi vitan er grundarlagið undir Havstovuni.

- Tí skal tann granskingarparturin av virkseminum altíð tryggjast.

Eilif Gaard sigur, at undanfarni stjórin legði stóran dent á, at starvsfólkið á stovninum hevði hægstu útbúgving.

- Sostatt hava tey flestu á havstovuni, sum hava granskingarstarv, doktaraheiti og heili seks studentar á Havstovuni eru holt við doktararitgerðir.

- Tað er eisini mennandi fyri stovnin. Samstundis er Havstovan við í fleiri altjóða granskingarverkætlanum. Tað er avgjørt eisini ein fyrimunur, at vit liggja avbera væl fyri mitt í Atlantshavi, tí tað blívur rættiliga natúrligt, at vit eru við í granskingarverkætlanum, sum fevna um hendan partin av havøkinum.

### Betri samstarv við vinnuna

Men eitt, sum nýggi stjórin eisini sær fyri sær, er, at Havstovan skal hava so tætt samband út í føroyska samfelagið, sum tilber.

-Tað skal vera so stutt sum gjørligt ímillum okkum og tey, sum brúka okkara vitan.



*Trý ættarlið: Í miðjuni Jákup Sverri Joensen, sum var fyrsti stjórin á Fiskirannsóknarstovuni; hann er 80 ára gamal. Tá hann fór frá vegna aldur gjørdist Hjalti í Jákupstovu stjóri. Og nú Hjalti legði frá sær tók Eilif við.*

Eilif Gaard sær fyri sær, at Havstovan framyvir skal hava gott samband við tey, sum dagliga hava havið og fiskiskap sum vinnuveg.

- Endamálið við tí skal vera, at Havstovan skal bæði lurta, fáa vitan og geva vitan frá sær.

- Havstovan skal vera ein natúrligur samstarvsfelagi hjá teimum í føroyska samfelagnum, sum hava brúk fyri vitanini hjá stovninum.

Hann ásannar, at sjálvandi hava tey, sum liva og virka í fiskivinnuni eina vitan um fiskivinnu, og hann heldur ikki, at Havstovan skal vera bangin fyri at lurta eftir teimum og at tosa við tey.

Í veruleikanum vilja vit jú øll tað sama, og tað er at gera tað besta fyri vinnuna og samfelagið, og tí fari eg at leggja doyðin á, at tað skal vera so stutt sum gjørligt frá Havstovuni og út til brúkaran og samfelagið.

Stjórin á Havstovuni hevur ikki enn gjørt sær greitt, hvussu tað skal gerast, men møguleikarnir eru fleiri.

- Tað ber til at bjóða umboðum fyri vinnuna inn á Havstovuna at skifta orð um vinnuna. Men tað ber eisini til at fara út ymsar staðir at halda fundir og fyrilestrar. Ein annar máti kann vera at skipa fyri onkrum fáum, men stórum tiltøkum – kanska ráðstevnum- av og á, har fleiri partar eru við og føra síni sjónarmið fram.

- *Heldur tú, at tað hevur verið ov langt ímillum Havstovuna og brúkaran, altso tey, sum starvast í fiskivinnuni og kanska politisku skipanina við.*

- Dagliga haldi eg, at samstarvið er gott. Men tað, vit hoyra mest um í fjølmiðlunum, er, tá ið tilmælini um fiskidagar koma einaferð um árið.

- Har hevur leiklutin hjá Havstovuni aftur og aftur verið at mæla til niðurskurð, og tað er væl skiljandi, at tey, sum hava vinnuna sum livibreyð, ikki eru samd við okkum, tí hvør vil verða skerdur.

- Okkara fremsta aðalmál er, at okkara tilmæli altíð skulu verða á fakliga høgum støði. Men vónandi kann tað gerast smidligari framyvir. Mín vón er, at vit kunnu varðveita okkara fakliga støði, men kortini kunna tosa okkum til rættis um, hvat er best at gera í eini ávísari støðu, sigur Eilif Gaard.

### Sjógvur, sangur og frísk luft

Eilif Gaard er ikki bara lívfrøðingur og stjóri á havstovuni. Hann hevur eisini sínar fríløtur, men hvat fæst maðurin við tá?

Ja, ikki slepst undan, at frítíðin er fyri ein part eisini knýtt at sjónum.

- Eg havi ein 24 fót Coronet, sum er ein skjóttgangandi glastrevjabátur, og nógv av frítíðini verður brúkt umborð á honum.

Hann plagar at vera í fjørðinum, og synirnir báðir eru lættir at lokka við, tí teimum dámar eisini væl at vera í báti, og tað ger tað ikki verri.

Annars plagar húskið at verða stimitúrar ymsastaðir við bátinum.

Eilifi dámar væl at vera úti í fískari luft, og tessvegna plagar hann eisini at vera suðuri í Trongisvági um sumrarnar og hoyggja.

Men hann hevur eisini eitt ítriv, sum brýtur heilt frá, og tað er, at hann syngur í kórinum Glymur.

# Æti og fiskur á Landgrunninum

At ójavnt er við føði til fisk á Landgrunninum frá tíð til aðra, er vælkent hjá øllum, sum fáast við fiskiskap. Viðhvørt hevur hann nógv av føði og er væl fyri, og til aðrar tíðir er minni, og fiskurin er rak. Slík skifti hava verið kend so leingi roynt hevur verið eftir fiski á landgrunni okkara. Men tað var ikki fyrrenn í 1990, at Havstovan miðvíst fór undir at kanna ætið á Landgrunninum. Tær fyrstu kanningarnar høvdu til endamál at fáa staðfest, hvat æti er á landgrunninum og hvussu nógv er og hvussu tað broytist við tíðini. Seinni bleiv arbeiðið víðkað til eisini at umfata, hvussu ymisku sløgini av æti verður ávirka av umhvørvinum og hvussu broytingarnar í æti ávirkar fisk. Við øðrum orðum varð farið undir at kanna, hvussu vistskipanin á Landgrunnurin virkar.

## "Hvør av øðrum liva má"

Eins og vit kenna tað á landi, virkar alt plantu- og djóralívið í sjónum saman, í føðiketum. Mynd 1 vísir í stuttum, hvussu liðirnir í føðiketunum á Landgrunninum hanga saman. Grundarlagið undir øllum djóralívinum er plantuætið. Hetta eru evarska smáar verur, tær flestu er einans 1/10-1/100 mm til støddar og kunnu tí ikki síggjast við berum eygum. Men leggja vit tær undir sjóneyku, síggja vit hvussu fjølbroyttar í skapi tær kunnu vera. Á mynd 2 sæst eitt dømi um, hvussu havsins gras kann síggja út.

Plantuætið sveimar ovarlaga í sjónum, har nóg mikið er av ljósi til at tað kann grógva. Gróðrartíðin á landgrunninum er vanliga frá apríl-mai til umleið august-september.



Vistskipanin á Landgrunninum. Gróðurin er grundarlagið undir øllum liðunum í føðiketunum.



Vanligt plantuæti í føroyskum sjógvi. Foto: Jahn Throndsen.



Vanligt djóraæti í føroyskum sjógvi.

Næsti liður í føðiketuni er djóraætið. Fyri tað mesta er hetta smá krabbadýr, 1-3 mm til støddar, ið liva uppi í sjónum. Nøkur dømi síggjast á mynd 3. Djóraætið livir av plantuæti og so skjótt sum gróðurin er kemur í sjógvin um várið, og djóraætið fær føði, byrjar tað at nørast og vaksa. Tá gróðurin minkar út á heystið, verður minni av djóraæti.

Tað plantuætið, ið ikki verður etið av djóraæti uppi í sjónum, søkkur niður á botn, har tað er føðigrundarlag hjá botndjórum.

Á landgrunninum er djóraætið føði hjá t.d. fiskayngli, nebbasild og hvítingsbróðri. Á víðum havi er tað høvuðsføðin hjá sild og makreli um summarið.

Botnfiskur, t.d. toskur og hýsa á landgrunninum eta síðan t.d. nebbasild, hvítingsbróðir ella botndjór.

Her sæst, at øll liðini í føðiketunum hanga saman. Plantuætið er fyrsti liður og er sostatt grundarlagið undir øllum hinum liðunum í vistskipanini.

## Ójavnur gróður sæst aftur í fiski og sjófugli á Landgrunninum

Kanningarnar av æti á landgrunninum síðani 1990 vísa, at gróðurin av plantuæti á Landgrunninum var sera ójavnur frá ári til annað. Tey bestu árini var umleið 5 ferðir meira gróður enn tey vánaligastu. Trý tíðarskeið vóru, har væl var av gróðri. Fyrsta tíðarskeiðið var í 1993-1995, næsta tíðarkeiðið var í 1999-2001 og triðja tíðarskeiðið hevur verið tey seinastu árini (Mynd 4). Ímillum hesi tíðarskeiðini var gróðurin lakari.

Tann ójavni gróðurin, sást týðiliga aftur í øllum liðum í føðiketunum á Landgrunninum. T.d. kann nevnast, at í øllum trimum tíðarskeiðunum við nógvum gróðri, kom væl undan av t.d nebbasild og aðrari føði til fisk og sjófugl. Hetta sást aftur í vøkstri og tilgongd hjá toski og hýsu (Mynd 5). Somuleiðis sást tað aftur í sjófugli.

Gróðurin á Landgrunninum síðani 1990.




Broytingar í gróðri, tilgongd av toski og hýsu, vekt á toski og hýsu á Landgrunninum og í tali av lomviga í Høvdanum í Skúvoy.




## At savna vitan

Ein partur av arbeiðinum hjá Havstovuni er støðugt at fáa til vega størri vitan um føðiviðurskiftini í okkara sjóøki, um hvørji viðurskifti í umhvørvinum stýra ójøvnu nøgdunum av æti og hvussu tað ávirkar tilgongd og vøkstur hjá ymisku fiskastovnunum. Hendan vitanin verður løgd afturat m.ø. stovnsmetingum, kanningum av tilgongd, vøkstri, magakanningum og veiðumynstrið.

Sjálvt um Havstovan ongantíð hevur havt so góðan førleika sum nú, er framvegis nógv eftir at fáa greiði á.

Einki er at ivast í, at teir ið dagliga starvast á sjónum, eisini síggja ymiskt ið er virðismikið, tá náttúrunar loynidómar skulu loysast. Vónandi ber til at fáa tær eygleiðingarnar struktureraðar, soleiðis at tær kunnu leggjast afturat teirri vitan, ið Havstovan megnar at fáa til vega.

# Aðalfundur í Maskinmeistarafelagnum



## Fiskiflotin sum arbeiðspláss

Tann føroyski fiskiflotin, telur í dag umleið 150 skip oman fyri 20 bruttotons. Av hesum eru tað 50, ið hava eini maskinorku oman fyri 750 KW. Tað sigla millum 200 og 210 maskinmeistarar í tí føroyska fiskiflotanum í dag.

Skipini fækkast og harvið eisini arbeiðsplássini. Tað eru komin nøkur nýggj og sera nýmótans skip í flotan - serliga innan uppisjóarflotan, men arbeiðspláss blíva ikki fleiri av hesi orsøk. Bæði politikarar og onnur tosa um at vit mugu hava alternativ, altso fleiri bein at standa á.

Dømi sum frálandavinnan, uttanlandssigling og FAS blíva nevnd í heilum, vit síggja í dag, at sjálvt við teimum skipum, har inntøkan er góð, ríma menn yvir í frálandavinnuna, ella norska fiskiflotan ein av orsøkunum til hetta er, at har eru sera væl skipaði viðurskifti.

Hetta burdi fingið Føroya Reiðarafelag at vakna og blivið burðardygt.

Fiskivinnan gevur ómetaliga nógv til tað føroyska samfelagið, men tað eru eisini skipabólkar, sum hava ómetaliga ringt við at tillagað seg til tey broyttu viðurskiftini.

## Fiskiflotin - sáttmálin

Nevndin í Maskinmeistarafelagnum samtykti ikki at siga sáttmálan við Føroya Reiðarafelag upp og heldur hann tí fram til januar 2011. Føroya Skipara- og Navigatørfelag tók somu støðu.

Fiskimannafelagið segði sáttmálan upp, men eftir nakrar fundir við Føroya Reiðarafelag bleiv sáttmálin framlongdur, uttan nakrar broytingar.

Nakað av tosi hevur verið ta seinastu tíðina, um fastlønarsáttmálar ella avtalur.

MF gav longu í 2008 Føroya Reiðarafelag eitt uppskot til fastlønarsáttmála. Okkara hugsan tá var at gera eina fastlønarskipan "omaná" verandi sáttmála. Í høvuðsheitinum verður tá talan um eina tryggjaða minstuhýru við eftirlønarskipan, 1:1- skipan og helst tryggari setanarviðurskifti t. v. s. longri uppsagnartíð við fullari løn, hettar kundi verið viðvirkandi til, at minstiforvinningurin partvís bleiv burtur.

Bæði valevnini til formann hjá FF hava boðað frá, at teir eru av teirri áskoðan, at FF skal kanna møguleikan fyri fastlønaravtalum og formaðurin hjá FSN segði í sínari røðu á aðalfundinum, at tíðin helst er komin til eina munandi nýmótansgerð av setanar- og lønarviðurskiftini innan fiskiskipasáttmálarnar.

MF tekur undir við hesum tankum og ein máti at byrja uppá hetta kundi verði at samráðast við hvønn skipabólk sær.

Eg kundi hugsa mær at teir í Gongini nr. 10 vóru meira aktivir. Tað sær út sum teir trívast best, tá onki hendur og tá gjøgnumskygni og opinleiki er so lítil sum møguligt.

## Inntøkutrygd hjá fiskimonnum o.a.

Í ólavsøkupakkanum verður sagt, at inntøkutrygdin eigur at vera ein spurningur millum avvarðandi vinnufeløg, t.v.s. Føroya Reiðarafelag og manningarfeløgini. Hvussu inntøkutrygdin verður skipað frameftir, eigur at verða upp til feløgini sjálvi at avgera.

Ein arbeiðsbólkur bleiv settur at gera landsstýrismanninum eitt tilmæli. Umboð í bólkinum eru manningarfeløgini og Meginfelag Útróðrarmanna, Føroya Reiðarafelag og Ráfiskaseljarafelagið. Alfred Petersen, advokatur er formaður og Thomas Magnussen er skrivari hjá arbeiðsbólkinum

Bólkurin hevur kannað hagtøl og skipanir í Norra, Danmark og Íslandi.

Í Norra er ein skipan, sum verður fíggjað við avgjaldi av landingum. Í Danmark er sáttmáli millum Danmarks Fiskeriforening og Faglig Fælles Forbund um eina minstu hýru. Íslendingar hava eisini eina skipan.

Hvat man so enn gerð, má man framhaldandi hava ein ella annan form fyri minstaforvinning. Hettar mál hevur helst størsta áhuga hjá Fiskimannafelagiðinum og Meginfelag útróðrarmanna.

Tá ein lóg er so gomul sum inntøkutrygdin, tolir hon nokk at verða endurskoðað.

## Sáttmálar á landi og hjá tí almenna.

- Hesir sáttmálar ganga út í 2010:
- Føroya Arbeiðsgevarafelag tann 1. juni
- SEV-IRF tann 1. oktober
- Alment settir á landi og sjónum tann 1. oktober

Gongdin í okkara grannalondum er tann, at arbeiðið fyri maskinmeistarar á landi er skjótt vaksandi. Serliga innan fyri orku, umhvørvið, og framtíðar supersjúkrahús fara at krevja fleiri væl útbúnar maskinmeistarar. Eisini verða fleiri maskinmeistarar settir í arbeiðið, har man fyrr kravdi verkfrøðingar.

Her er tað mín fatan at hugburðurin hjá Lønardeildini í fíggjarmálaráðnum ikki klárar at fylgja við. Hann er konservativur og fongdir við vanahugsan.

Ásannandi ta sera ivasomu støðuna á privata arbeiðsmarknaðinum, hevur nevndin gjørt av, ikki at siga sáttmálan við FAG upp og hann heldur tí fram óbroyttur. Her er talan um fáar limir og hetta er eisini ein minimum sáttmáli.

## Nýggir sáttmálar

Sáttmálar eru nú gjørdir við Frakt og Sandsøluna í Runavík og við Sandgrevstur í Fuglafirði. Hesir sáttmálar líkjast teimum, sum við hava við Reiðarafelagið fyri Farmaskip. Tó eru hýrurnar nakað betri.

## Farmaskipasáttmálin

Tann 1. mars 2009 kom nýggjur sáttmáli í gildi og bleiv hetta ein tvey ára sáttmáli. Hýrurnar hækkaðu við 3,22 % hvørt árið og sum nakað nýtt kom ein einameistaraviðbót við í hendan sáttmála.

Tað serliga við hesum sáttmála er eftirlønaravtalan, har inngoldið verður av skattaðum peningi.

Vanliga verða eftirlønargjøld goldin av arbeiðsgevara, áðrenn skatt t. v. s., at gjaldið skal ikki roknast uppí skattligu inntøkuna. Orsøkin til at eftirlønargjøldini í FAS verða inngoldin við skattaðum peningi er, at eftir reglunum um FAS skipanina, fær reiðarin endurgoldið 35% av øllum lønarútreiðslum Tí verður eftirlønin útgoldin yvir skattaskipanina eins og løn.

Hetta hevur ført til nakað av óvissu um inngjøldini til eftirløn í FAS.

Manningarfeløgini eru varð við hendan trupulleika og hava haft fund við LÍV og TAKS. Eisini hava vit haft samband við tann politiska fylgibólkin, nú nýggj pensjónsskipan skal setast í verk.

Neyðugt verður nokk at gera eina serstaka lóg um eftirløn fyri teir sum sigla í FAS. Manningarfeløgini hava gjørt eitt ískoyti, til eftirlønarsáttmálan fyri FAS inngjøld, so hesi fara inn á eina uppsparing við skattaðum inngjaldi og skattafríum útgjaldi Skatturin er 35 %, so limir okkara missa onki við hesi skipan.

## FAS - fremmand skip

FAS skipanin mennist alsamt og tað hava serliga verið svensk reiðarí, sum hava víst skipanin ans.

Eisini eru bæði norsk og íslendsk skip, sum hava flaggað inn.

Tey svensku skipini hava eisini aðrar nationalitetir umborð umframt

svenskarar og er hettar oftast sjófólk av Filipsoyggjum ella úr Rumenia. Russarar eru eisini við fleiri av teimum skipum sum hava flagga inn.

Manningarfeløgini hava tí arbeitt við at gera eitt samtak, til at taka sær av sáttmálaviðurskiftum hjá útlendskum sjófólkum. Hettar arbeiði er ikki heilt liðugt enn, men man er samdur um at kalla samtakið Faroese Maritime Unions stytt FMU.

Tað er umráðandi, at tey reiðarí sum flagga inn og umboðsmenn teirra her á landi eru seriøsir, so man ikki fær ein gráðan markna á hesum øki.

### Strandfaraskip Landsins

Um mánaðarskifti okt. – nov. segði SL allar staðbundnar avtalur upp.

MF, FSN og Starvsmannafelagið samdust um, at senda eitt felags svar til SL um at vit ikki ynsktu at gera nýggjar staðbundnar avtalur. Hettar bleiv fráboðað í brævi tann 26. november.

SL boðaði í jólavikuni frá broyttari ferða- og arbeiðsætlan frá 1 januar 2010 at rokna og at allir lønarbrøkar fóru niður t.v.s. lægri arbeiðstíð og samsvarandi lægri løn. Vit boðaðu SL beinan vegin frá, at Maskinmeistarafelagið heldur fast við fráboðanina í brævinum dagfest 26. november 2009 og felagið kann ikki góðtaka, at nakað verður broytt viðvíkjandi galdandi sáttmála og avtalum, fyrr enn vit hava havt høvi til at samráðast nærri um hetta.

Tað vóru tveir samráðingarfundir millum SL og manningarfeløgini í januar har SL spurdi, um tær staðbundnu avtalurnar ikki kundu framleingjast.

Feløgini boðaðu frá, at tey vildu ganga við til at uppsagnarfreistin av galdandi staðbundnu avtalum varð longd til 1.mars, soleiðis at SL fekk høvi at umhugsa málið gjøllari og eisini kann viðgera tað saman við Lønardeildini.

Síðani var ein fundur millum SL, Lønardeildina og manningarfeløgini og semja var um at SL skuldi umhugsa støðuna einaferð enn. Tann 16. februar boðaði SL so frá, at tey ynskja at taka aftur uppsøgnina av staðbundnum avtalum og at Smyril skal halda fram við fullum lønarbrøki.

Viðvíkjandi Skopunarleiðin og Nólsoyarleiðini verður arbeitt við at seta fýra manningar upp á fulla tíð til at sigla við Teistanum og Ternuni.



### Føroysk sjófólk, sum sigla í øðrum londum

Síðsta vár heitti Maskinmeistarafelagið og Føroya skipara- og Navigatørfelag á Granskingardepilin fyri Samfelagsmenning um at gera eina lýsing av ymiskum viðurskiftum hjá einum parti av føroyska arbeiðsmarknaðinum.

Feløgini vildu við hesari kanning hava staðfest fleiri viðurskifti, sum hava við føroyskar sjómenn at gera, t. d.:

- Hvussu nógvir føroyskir sjómenn sigla í øðrum londum og um gjørligt hvar?
- Hvussu stóra inntøkur hava hesir?
- Hvussu er
- a) talið av sjómonnum og
- b) inntøkan broytt tey seinnu árini?
- Hvørja ávirkan hava inntøkurnar hjá hesum sjómonnum á lands- og kommunalbúskapin?

Kanningin stendur á okkara heimasíðu, og er eisini væl lýst í Mið og Magn nr. 3.

Kort kann sigast at tað eru 961 sjófólk skrásett í øðrum londum og at samlaða inntøkan hjá hesum fólkum er 320 mió. kr um árið. Oman á uttanlands sjóinntøkuna skal leggjast avleitt virksemi.

Tilsamans gevur hetta næstan 620 mió. og harvið sæst, at hendan inntøkan skapar munandi virksemi í føroyska búskapinum. Man kann gott siga, at hendan inntøka kann teljast sum eitt av beinunum, sum hetta samfelagið stendur á.

Tann negativa umrøðan, sum var áðrenn av hesum sjómonnum, tykist nú at vera steðgað.



*Frá vinstru: Nevndarlimirnir Ólavur Gunnarsson, Jóan Petur Patursson, Petur Egholm og Regin Olsen, næstformaður*

### Skipaeftirlitið og Sjóvinnuráðið

Tað hava verið trý mál til viðgerðar í Sjóvinnuráðnum síðan mars í fjørð.

Eitt av hesum málum hevði sera stóran týdning fyri Maskinmeistarafelagið. Tað snúði seg um framtøkumegi.

Vit blivu varugir við, at Skipaeftirlitið hevði broyt mannagongdirnar og tulking av ásetingin av motororku og í hesum sambandi gjørt eina nýggja tulking av ásetingin í manningarlógini um framtøkumegi.

Í tí føroysku lógini stendur:

§2. Stk. 12. "Framtøkumegi": Øll tann samanlagda megin í kilowatt (kW), men soleiðis at brotin tøl falla burtur, um nøkur eru, við støðuga gongd á øllum maskinum, sum samstundis kunnu dríva skipið fram. Orkan verður ásett grundað á royndarflatutalvuna hjá motorverksmiðjuni, og verður hon at seta í siglingarloyvisbrævið og manningarskjalið.

Hetta mál bleiv kært til Sjóvinnuráðið og skrivaðu vit m.a. í kæruni, at um Skipaeftirlitið ynskir at gera nýggjar reglur, so skulu allir viðkomandi partar hava høvi til at hoyrast, áðrenn avgerð verður tikin um broytingar og tað kann ikki bera til, at ein almennur myndugleiki tilvildarliga kann broyta lógartulkingar sínar. Maskinmeistarafelagið fekk viðhald frá Sjóvinnuráðnum.

Sjóvinnuráðið sigur m. a. í sínari niðurstøðu, at Skipaeftirlitið kann ikki við tulking gera so vittfevnandi broytingar í lógini, at tað í royndum má metast sum lógarbroyting. Víðari verður sagt, at einki grundarlag er hvørki í lógartekstinum ella viðmerkingunum til lógina fyri nýggju tulkingini hjá Skipaeftirlitinum.

### Kanning av oljunýtslu

Í oktober mánaði fingu vit ein fyrispurning frá Havstovuni um vit høvdu hug at verða við í eini kanning um oljunýtslu hjá Føroyskum fiskiskipum.

Hetta er ein sera áhugaverd verkætlan, sum felagið hevur sagt seg vilja vera við til.

### Limagjald, pengar og ognir

Nevndin samtykti kort eftir síðsta aðalfund at fastleggja teir regluligu nevndarfundirnar. Teir eru nú síðsta fríggjadag í hvørjum mánaði.

Eisini bleiv reglugerðin fyri nevndararbeiði og skrivstovuhald og setanarsáttmáli hjá skrivstovuleiðara endurskoðað og dagførd.

Sum vit fara at síggja á roknskapinum so eru inntøkurnar frá limagjaldi munandi minkaðar síðsta árið men felagið er tó væl fyri fíggjarliga.

### Limamál

Tað hava verið nøkur ymisk limamál, sum felagið hevur arbeitt við m.a. órættvísar uppsagnir, ikki útgoldin uppsagnarhýra ella løn fyri arbeiði millum túrar. Í slíkum førum ger felagið sum oftast tað, at vit fáa frágreiðing frá báðum pørtum og síðani verður ein løgfrøðilig niðurstøða gjørd. Nøkur mál blíva loyst eftir at felagið er komið uppí og onnur enda í rættarskipanin. Tað er ógvuliga umráðandi, at hvør einstakur limur fylgir væl við sínum lønarviðurskiftum, tí tað er ofta torført at koma afturumaftur tá long tíð er gingin. Tað er eisini umráðandi at maskinmeistarar ikki taka av einum starvi, uttan ein skrivlig avtala fyriliggur, sum útgreinar setanar og lønarviðurskifti.

### Føroya Motorpassarafelag

Á aðalfundinum í fjør boðaðu vit frá, at nevndin hevði samtykt at taka limirnar hjá Føroya Motorpassarafelag upp í felagið.

Í samband við avtøkuna av Føroya Motorpassarafelag hava vit skilt, at teir



ynskja at ognir felagsins kunnu fylgja við yvir í Maskinmeistarafelagið og tá krevst, at ein formel samanlegging verður gjørd.

Vit hava fingið eitt uppskot til samanleggingarsáttmála frá Páll Nielsen, advokati og tað er gjørt soleiðis, at tað samanlagda felagið í praksis verður Maskinmeistarafelagið við núgaldandi lógum, nevnd o. s. v.

Síðani verða allir limirnir í Føroya Motorpassarafelag skrásettir sum limir í Maskinmeistarafelagnum og hava tá somu rættindi og skyldur, sum allir aðrir limir í Maskinmeistarafelagnum.

Hóast talan er um formalitetir, so metir nevndin í Maskinmeistarafelagnum, at tað er neyðugt at aðalfundurin tekur støðu til samanleggingina og vit fara tí at leggja málið fram til støðutakan undir pkt. 8 í fundarskránni.

## Vinnuháskúlin

Hóast verandi útbúgvingar á Vinnuháskúlanum nokk eru góðar, so er veruleikin bara tann, at okkara grannalond Norra, Danmark, Svøríki og Finnland nú øll nú bjóða bachelorútbúgvingar. Eg kenni ikki ordiliga til, hvat Íslendingar gera. Tað sum er sera umráðandi fyri okkum er, at vit ikki isolera okkum her í Norðuratlantshavi og enda við einum prógvi, sum eingin annar kennir uttan vit sjálvir.

Tað verður javnan sagt at maskinmeistaraútbúgvingin er ein sera breið útbúgving, men her skulu vit verða á varðhaldi soleiðis, at tá man styrkir tann maritima partin, so má tann land plaseraðar parturin ikki gloymast, tí hesin mennist og veksur skjótt í okkara grannalondum.

Tað eru so at siga ongir møguleikar at fáa eftirútbúgvingar ella skeið fyri maskinmeistarar her á landi og felagið hevur tí haft fund við leiðsluna á Vinnuháskúlanum um at fáa gjørt nakað við hetta.

## Mið og Magn

Maskinmeistarafelagið og Føroya Skipara- og Navigatørfelag fóru í apríl mánað 2009 undir felags blaðútgávu. Endamálið er kunna limirnar um viðkomandi mál og hava greinar í blaðnum sum eru upplýsandi og hava almennan týdning.

Ikki kann sigast annað enn at blaðið hevur fingið eina góða byrjan og er í ferð við at finna sín fasta form.

Tað hava verið einir 3 til 4 blaðfundir til hvørja útgávu. Næsta blað kemur nú í apríl við millum annað umrøðu av aðalfundinum hjá okkum.

## NMF

Tað hava verið tveir fundir, tann fyrri í Keypmannahavn 06. apríl 2009.

Har vit fingu millum annað frágreiðing um arbeiðið hjá FICT og visiónir hjá EF um framtíðina á tí maritima økinum.

Formaðurin og skrivarin luttóku á hesum fundi.

Næsti fundur var í Oslo tann 5. september 2009, har formaðurin og Ólavur Gunnarsson nevndarlimur luttóku. Her var eitt av evninum fíggjarkreppan og møguligar avleiðingarnar.

Næsti fundur innan NMF verður her í Tórshavn í næsta mána.

## Samstarv

Í juli 2009 undirskrivaði Maskinmeistarafelagið avtalu við Maskinmesterforeningen í Danmark.

Avtalan leggur upp til eitt miðvíst samstarv millum feløgini. Í fyrsta partinum av avtaluni verður nevnt, at partarnir m.a. virða sáttmálaøkini hjá hvørjum øðrum. Eisini skulu bæði feløgini veita limum hjá hvørjum øðrum hjálp um brúk er fyri tí.

Maskinmeistarafelagið hevur í farna árið haft eitt gott samstarv við FSN, FF í fleiri málum har vit hava haft felags áhugamál. Eisini hava vit gott samstarv við starvsmannafelagið um mál innan SL.

## Nýggjur nevndarlimur

Á aðalfundinum í Maskinmeistarafelagnum var sjálvandi eisini nevndarval á skránni.

Tveir nevndarlimir stóðu fyri vali. Teir vóru Jóan Petur Patursson, sum boðaði frá, at hann tekur við afturvali og Petur Egholm, sum boðaði frá, at hann tók ikki við afturvali.

Sostatt var Jóan Petur Patursson afturvaldur, men nýggjur nevndarlimur er John Højsted, sum annars var tiltakslimur.

Tiltakslimir vóru eisini valdir á aðalfundinum, og teir eru Poul Henning Jacobsen, sum er fyrri tiltakslimur og Eirikur Gunnarson, sum er annar tiltakslimur.

Hinir nevndarlimirnir eru: Páll Hansen, formaður, Regin Olsen, næstformaður og Ólavur Gunnarsson.

## NMF fundur í Føroyum

Tann 11. apríl hevur Nordisk Maskinføderation, NMF, fund í Føroyum. Hetta er ein felagsskapur fyri allar maskinmeistarar í Norðanlondum, sum eru einir 28.000 í tali tilsamans.

Felagið hevur tveir fundir um árið, og tey ymsu norðurlondini skiftast um at skipa fyri.

Á fundinum hittast formenninir og skrivararnir í maskinmeistarafeløgunum í Norðurlondum at tosa um felags áhugamál av ymsum slagi.

Seinni fundurin í ár verður í Íslandi í heyst. Tey ymsu norðurlondini skiftast eisini um at hava formansskapin í felagnum, og á fundinum í heyst verður formaðurin í Maskinmeistarafelagnum í Føroyum varaforseti, sum tað eitur, í NMF, og formaðurin í maskinmeistarafelagnum í Finlandi verður forseti.

Í løtuni eiga danir formansskapin.

Hvørt valskeið er trý ár, so um trý ár verður formaðurin í Maskinmeistarafelagnum sostatt eisini forseti í NMF.

Hetta verður aðru ferð, at føroyingar eiga formansskapin, tí fyri umleið 20 árum síðani var Eli Davidsen, táverandi formaðurin í Maskinmeistarafelagnum, forseti í NMF í eitt trý ára skeið.



*Til vinstru John Højsted, nývaldur nevndarlimur.*



*Poul Henning Jacobsen, 1. tiltakslimur næstuttast til høgru (í hvítari blusu)*

### Stuðulsgrunnur kemur væl við

Maskinmeistarafelagið hevur ein stuðulsgrunn, har ein fimtingur av limagjaldinum verður sett í.

Hetta er ein grunnur, sum veitir limum, sum koma illa fyri av sjúku ella skaða, fíggjarligan stuðul.

Hetta er ein grunnur, sum fær einar fýra, fimm umsóknir um árið, og hann hevur víst seg at vera ómetaliga hentur.

- Mangan vísir tað seg, at fólk, sum verða sjúk ella fáa skaða, detta niður ímillum tær almennu hjálparskipanirnar av ymsum orsøkum.

Ein orsøk kann vera, at óarbeiðsførið dregur so leingi út, at stuðulin úr almennu sosialu skipanunum heldur uppat.

Men so hava vit hendan grunnin, sum loftar teimum, og hann hevur fleiri ferðir prógvað sítt tilverugrundarlag.

### Lættari at gerast limur

Nú kunnu onnur enn akkurát maskinmeistarar verða limir í felagnum. Og tað skal verða lættari at fáa limaskap í felagnum. Tað samtykti aðalfundurin.

Tað var nevndin í felagnum, sum skeyt upp at broyta grein 4 í lógum felagsins, har tað verður umrøtt, hvør kann verða limur í felagnum.

Sum støðan hevur verið, kunnu fólk við aðrari útbúgving enn fólk við prógvi sum maskinmeistari ella maskinist, eisini verða limur í felagnum.

Treytin er, at tey arbeiða innan øki, sum má metast at vera innanfyri sama fakøki og annars, at tey arbeiða í maskintænastu.

Men í slíkum førum hevur tað verið neyðugt hjá nevndini at taka avgerð um limaskapin í hvørjum einstøkum føri.

Men nú vildi nevndin, at tað skuldi verða lættari hjá fólki við ymsum útbúgvingum, har tey kunnu arbeiða á maskinøkinum og hjá fólki, sum ikki hava eitt ávíst ástøðiligt prógv, at verða limir í felagnum, uttan at nevndin skuldi taka støðu í hvørjum einstøkum føri.

- Føroyski arbeiðsmarknaðurin er so lítil, at tað ber illa til at hava eitt fakfelag fyri hvørja einastu útbúgving ella hvørt einasta starvsøki, sigur nevndin.

Tí vil hon savna øll, sum starvast í maskintænastu, í Maskinmeistarafelagnum.

Páll Hansen nevndi eitt ítøkiligt dømi um ein íslendskan køliteknikara, sum nú er í Føroyum.

- Hann hevur eina serliga íslendska útbúgving, sum ikki er í Føroyum. Í Íslandi varð hann nevndarlimur í Maskinmeistarafelagnum, men í Føroyum hevur hann ikki so frægt sum havt rætt til at verða limur í felagnum, segði formaðurin.

Tá ið atkvøtt var um spurningin, tók ein heilt stórur partur av aðalfundinum undir við nevndini.

### Inntøkutrygdin

Maskinmeistarafelagið er umboðað í arbeiðsbólkinum, sum arbeiðir við at umleggja inntøkutrygdina hjá manningunum við fiskiskipum, og tað arbeiðið gongur væl, greiddi formaðurin frá.

Endamálið við arbeiðnum er at fáa útreiðslurnar til inntøkutrygdina av fíggjarlógini, so at tað framyvir verða reiðarar og manningarfeløgini, sum fíggja skipanina sjálvi.

Og Páll Hansen, formaður, sigur, at tað arbeiðið gongur væl.

Hann sigur, at eitt, sum hevur seinkað arbeiðnum, er, at tað varð lagt fullkomiliga stilt í tveir mánaðir í sambandi við, at formansval var í Fiskimannafelagnum um árskiftið.

Formaðurin í Maskinmeistarafelagnum sigur, at í sambandi við arbeiðið, verður hugt eftir, hvussu inntøkutrygdin er skipað í hinum norðurlondunum.

Hann hevur ikki fingið fulla greiði á skipanini í Íslandi, men skal hann døma eftir, hvat teir fiskimenn, sum hava siglt við íslendskum skipum, siga, er teirra inntøkutrygd lítið at reypa av.

Í Danmark er skipanin tann, at fiskimenn eru tryggjaðir eina minstuløn upp á 1000 krónur um dagin, men tað er ásett í sáttmálanum millum fakfelagið 3F og Reiðarafelagið.

Í Noregi hava tey lagt á ein annan bógv, tí har verða eini 3% tikin av avreiðingarvirðinum, hvørja ferð eitt skip avreiðir, og sett í ein minstulønargrunn.

Reiðarin betalir so fasta hýru, men dekkar avreiðingarvirðið ikki ta føstu hýruna, fær hann munin endurgoldnan úr grunninum.

Ein annar munur, er, at í Føroyum verður inntøkutrygdin roknað túr fyri túr. Men í Noregi verður tað roknað fyri hvønn ársfjórðing sær.

Minstalønin í Noregi er einar 58.000-59.000 norskar krónur fyri ársfjórðingin, so tað er ikki langt frá okkara minstuløn í Føroyum.

Páll Hansen dugir ikki at siga, nær eitt úrslit fyriliggur, og hann dugur heldur ikki at siga, hvat úrslitið verður.

Men sjálvur heldur hann, at norska skipanin er áhugaverd.

### Fasti Gerðarrætturin

Maskinmeistarafelagið er sinnað at viðgera spurningin um tíðarfreistir í sambandi við arbeiðssteðgir, soleiðis sum Fasti Gerðarrætturin vil.

Men tað kostar, vit góðtaka onga tíðarfreist uttan at fáa nakað afturfyri leggur formaðurin dent á.

Sostatt vil felagið ikki frammanundan afturvísa illa umstríddu niðurstøðuni í Fasta Gerðarrættinum í Portørmálinum herfyri.

Har var niðurstøðan, at arbeiðssteðgir og verkføll eiga at verða fráboðað frammanundan við eini rímiligari tíðarfreist.

Men samstundis sum Páll Hansen sigur seg vera sinnaðan at tosa um tíðarfreistir, leggur hann stóran dent á, at tað verður ikki ókeypis at áseta nakra tíðarfreist, tá ið verkføll vera lýst.

Maskinmeistarafelagið er einasta manningarfelagið, sum hevur skrivað undir sáttmálan um Fasta Gerðarrættin.

Ein orsøk til tað er, at felagið hevur skjótt líka nógvar limir í arbeiði á landi sum á sjónum.

Tilsamans eru 600 limir í Maskinmeistarafelagnum, men tað er ikki meir enn ein triðingur av teimum, sum eru við við fiskiskipum. So er ein partur við øðrum skipum, men skjótt er helvtin í starvi á landi.

### Fáa ikki tíðarfreist fyri einki

Men hóast formaðurin í Maskinmeistarafelagnum er sinnaður at tosa um tíðarfreistir, er hann alt annað enn fegin um niðurstøðuna í Fasta Gerðarrættinum, tí hann heldur, at tað er tann persónliga meiningin hjá dómarunum, ið er komin til sjóndar, og tað hóvar honum als ikki.

Páll Hansen sigur, at prátið um tíðarfreistir er ikki ókent í Maskinmeistarafelagnum.

Men hann leggur afturat, at við úrskurðinum í Portørmálinum, hevur Fasti Gerðarrætturin roynt at geva arbeiðsgevarunum eina tíðarfreist til gávus.

- Men tað verður av ongum, tí skulu vit tosa um eina tíðarfreist, skulu vit hava nakað afturfyri, leggur hann dent á.

Páll Hansen sigur, at hvørja ferð, fakfeløg hava tosað um eyka frídagar, hevur arbeiðsgevarin verið skjótur við roknimaskinuni og hevur roknað seg fram til, at skulu **vit** hava fleiri frídagar, kostar tað ein ávísan prosentpart av lønarkarminum.

- Nú fara vit at brúka sama hugsunarhátt: Skulu vit góðtaka eina tíðarfreist, kostar tað eina eyka lønarhækking, tí tað kemur ikki upp á tal, at vit geva rættindi frá okkum uttan at fáa nakað afturfyri.

### Frásøgdu sær verkfalsrættin

Páll Hansen sigur, at tað er púra vanligt, at løntakarar fáa eyka ágóðar fyri at frásiga sær rættindi, og soleiðis skal eisini vera í hesum føri.

Í hesum sambandi sipar formaðurin í Maskinmeistarafelagnum til ein sáttmála, sum felagið gjørdi við Reiðarafelagið fyri Farmaskip í 2001 um maskinmeistarar í frálandavinnuni.

- Tað var ein sáttmáli, har vit góvu verkfalsrættin frá okkum í fimm ár.



Men afturfyri fingu vit eina rættiliga stóra lønarhækking, sigur Páll Hansen.

Hann leggur afturat, at í frálandavinnuni hevur friður valdað í 11 ár, men tað er tí, at lønin er komin upp á eitt rímiligt støði.

Og hann sær fyri sær, at friður verður í nógv ár afturat, tí sum støðan er nú, er tað einki, ið talar fyri tí øvugta.

### Siga sáttmálan upp

Maskinmeistarafelagið hevur annars tikið undir við at uppsiga sáttmálan um Fasta Gerðarættin, og taka onnur feløg undir við tí, verður tað gjørt, so at sáttmálin fer úr gildi á nýggjárinum.

Sáttmálin um Fasta Gerðarrættin kann sigast upp við seks mánaða freist til ein 1. januar.

Tað merkir, at í seinasta lagi 30. juni kann sáttmálin sigast til at fara úr gildi 31. desember í ár

Páll Hansen sær ongan tupulleika í hesum, tí so ber til at samráðast seg fram til ein betri sáttmála við neyvari orðingum um myndugleikaøkið hjá Gerðarættinum.

Við hesum hevur hann ikki sagt, at lønin í Føroyum er lág, tí tað heldur hann ikki, serliga ikki við teirri skattaskipan, sum er.





*Ólavur Gunnarsson og Jóan Petur Patursson, nevndarlimir.*



# Tróndur í Gøtu kom til Føroya 24. mars 2010










### Nøkur teknisk tøl

Total longd: 81,60
Breidd: 16,60 m
Stingur 7,20 m
Motorur: Wartsli 12v32; 6.000 kw.
Tríggir generatorar: GL20; 10.110 kw.
Ein Leroy Sonar aksilgenerator.
Bratvaag trolspøl.
Kranar: Triplex.
Fiskapumpur: Karmøy
RSV system; Iras
Køliskipan: Johnsons Control.
Design: Vik-Sandvik A/S

# Hans Johannis á Brúgv gestarøðari

**Røða á aðalfundinum hjá Maskinmeistarafelagnum**



*Hans Johannis á Brúgv*

Fyrst vil eg nýta høvið at takka nevndini í Maskinmeistarafelagnum fyri at vísa mær tað álit at halda hesa gestarøðu her á aðalfundi Maskinmeistarafelagsins.

Smb. bókini, Maskinmeistaraskúlin hjá Finni Johansen, varð byrjað at lesa til maskinmeistara í Føroyum í 1965. Sostatt eru nógvir av limum felagsins útbúnir maskinistar og maskimeistarar á Maskinmeistaraskúlanum, nú Vinnuháskúlanum.

Útbúgvingin er broytt nakað. Í dag hanga maskinist- og maskinmeistaraútbúgvingarnar ikki saman, eins og tær gjørdu fram til 2004. Útbúgvingarnar eru tvær ymiskar útbúgvingar. Í dag eitur einki víðkað maskinmeistarútbúgving. Tann víðkaða maskinmeistaraprívtøkan varð burtur í lógini frá 1988.

## Maskinistútbúgvingin í dag

Maskinistútbúgvingin er í dag 9 mðr og maskinmeistaraútbúgvingin er 3 ár. Eg kann í hesum samanhangi stutt leggja afturat, at skipara- og skipsføraraútbúgvingarnar eru samanhangandi – 1½ ár hvør.

Í dag eru 254 lesandi á Vinnuháskúlanum. Av hesum eru 110, ið lesa til maskinmeistara og 24 til maskinist.

Hesi seinastu árini hava fleiri reiðarí verið á skúlanum áðrenn endaprívtøkuna, eins og setanarsamrøður hava verið próvhandanardagin. Hetta skapar álit og stoltleika um fakið og vísir, at tit limir hava eina eftirspurda útbúgving.

## Heimsbúskaparkreppan

Heimsbúskaparkreppan ávirkar okkum øll og harvið eisini teir nýútbúnu. Tó haldi eg meg kunna siga, at broytingin er, - at lidnu næmingarnir nú bíða nakrar fáar mánaðir, - so bítur á.

Vit hava í 2009 hoyrt um, at størru donsku reiðaríini hava sagt upp yvirmenn fyri so at seta fólk úr øðrum tjóðskapi umborð. Her er longu broyting við at koma í. Stór reiðarí hava í februar í ár sett seg í samband við Vinnuháskúlan við áheitan um at fáa fatur á teimum, sum fingu prógv á jólum. Eisini ynskja reiðaríini at tosa við teir, sum eftir ætlan fáa prógv í juni í ár.

## Stórur mangul í 2013

Smb. tølum frá DREWRY verður mett, at longu í 2013 verður ein mangul á 56.000 offiserum worldwide (í heiminum). Harvið eru útlitini til tey, sum lesa okkara útbúgvingar á Vinnuháskúlanum, sera góð.

Hetta viðførir sjálvandi eisini, at korini gerast enn betri, og koma orðini í lýsingum okkara, makt, frítíð og pengar", at vera enn sjónligari í framtíðini.

Nú eg eri her á fundi í Maskinmeistarafelagnum, vil eg vísa á, at tykkara val at gerast maskinmeistari var og er eitt sera gott val, sum gevur tykkum ein tann besta pallin at standa á – tit eru faktiskt gullfiskar, sum øll vinnan í heiminum ynskir at fáa fatur á.

## Framtíðin

Tað liggja broytingar fyri framman. Í øllum londum kring okkum, eins og í øðum londum, eru útbúgvingarnar maskinmeistari og skipsførari broyttar til útbúgvingar á bachelorstøði.

Sum dømi kann nevnast, at allar maskinmeistaraútbúgvingarnar í Danmark vórðu broyttar til proffessionsbachelor í 2004. Tað eru 6 ár síðani. Vinnuháskúlin setti niður arbeiðsbólk, og í 2006 varð álit sent Landsstýrismanninum í mentamálum, har skúlin vísti á, at vit eisini mugu fylgja við rákinum.

## Útbúgvingarráðið

Útbúgvingarráðið fyri útbúgving av fólki á sjónum, ið er mannað við umboðum frá Maskinmeistarafelagnum, SEV, Reiðarafelagnum fyri farmaskip, Reiðarafelagnum, Skipaeftirlitinum, Skipara og Navigatørfelagnum hava viðgjørt hetta mál. Niðurstøða er gjørd, og sendi útbúgvingarráðið tann 21. apríl 2008 tilmæli til Mentamálaráðið, har heitt varð á Landsstýriskvinnuna um at skipa Maskinmeistara- og skipsføraraútbúgvingarnar á Bachelorstøði.

## Fyrimunirnir við bachelor

Fyrimunirnir við bachelorstøði eru, at vit fáa ein enn betur kvalificeraðan maskinmeistara/skipsførara. Skipini vaksa, motorarnir vaksa, teknikkurin veksur, ábyrgdin økist og harvið krøvini til yvirmenninar. Samstundis økjast krøvini til aðrar tilknýttar fakbólkar umborð og á landi. Tilsamans merkir hetta, at vit eisini mugu lyfta okkara førleikastøði upp og harvið vera enn betur førir fyri at taka ábyrgd. Stóru skipini, sum menn okkara hava ábyrgdina av, hava eitt kolosalt virði. Tryggingarvirðið á risastóru handilsskipunum er omanfyri Dkk 10 mia, tá tey eru lastaði. Henda ábyrgd viðførur, at kravið til førleikan hækkar.




*Mynd 1 vísir hvussu vit hava hugsa lesturin til maskinmeistara og skipsførara á bachelor støðið.*

## Verandi maskinmeistaraprógv

Við verandi føroyska maskinmeistarapróvnum, sum er ein millumlong útbúgving, eru sera fáir møguleikar at fara undir víðari lestur. Í nógvum førum er neyðugt at byrja umaftur, tvs fyrst 3 ár og síðani 2 afturat, fyri at náa eina masterútbúgving. Verða okkara útbúgvingar broyttar til Bachelorstøði, vil hetta økja sera nógv um møguleikan fyri víðari lestur og harvið økja starvsmøguleikarnar á landi, um ein seinni ynskir tað.

Vanligt innan hetta yrki er, at menn eftir at hava siglt nøkur ár ynskja á land at arbeiða. Royndirnar eru nógvar, men tá hesar verða settar upp móti øðrum lesandi, vísir tað seg, at sera nógvar útbúgvingar hava bachelorstøði. Einans av hesi orsøk kann tað gerast trupult at fáa arbeiði á landi.

## Møguleiki fyri broyting

Tá ungfólk velja sær útbúgving, tryggja tey sær, at møguleiki er fyri broyting. Tey vilja ikki læsa seg fastan í einum yrki. Sostatt velja tey útbúgvingar, sum hava møguleika fyri víðari lesturi og ikki blindgøtur.

Eisini av hesi orsøk er tørvur á, at vit broyta okkara útbúgvingar á Vinnuháskúlanum til bachelorstøði. Tey ungu skulu hava møguleika at velja okkara útbúgvingar, og um tørvur er á tí fara undir víðari lestur á masterstøðið, uttan at taka 3 ár umaftur.

## Kunnu risikera at verða vald frá

Fólk omanfyri 40 ár tillaga seg nærum allar umstøður, meðan fólk, sum eru yngri enn 30 ár, seta krøv, tað veri seg til útbúgvingar ella umstøður. Sostatt hava vit einki val. Eru møguleikarnir fyri víðari lesturi á Vinnuháskúlanum ikki teir somu sum aðrastaðni, so kunnu vit risikera at verða vald frá.

Mett verður, at henda broyting kann viðføra at fleiri við miðnámi, koma at leita sær útbúgving á Vinnuháskúlanum. Í dag hava lesandi á Vinnuháskúlanum vanliga ikki miðnámsskúla, men hinvegin langa tíð í smiðjulæru ella siglingartíð.

Alt hetta viðførir eisini, at førleikin hjá teimum, sum undirvísa, skal økjast til masterstøði. Komi ikki nærri inn á hetta hesaferð.

## Hóttanir

Fyrr havi eg nevnt, at møguleikarnir við hesum útbúgvingum eru framúr, - serliga um ein sær heimin sum eitt arbeiðspláss. Tó síggi eg hóttanir innan hetta fakøki.

Hyggur ein í hagtøl frá yrkisdeplinum (mynd 2), so sæst, at talið av lærlingum lækkar sera nógv. Í ´98 vóru tað 69, í 2006 vóru tað 124 og 2009 vóru tað bert 32 lærlingar,

*Mynd 2. Lærlingatilgongdin í Føroyum.*




sum lúka upptøkukrøvini til maskinútbúgvingarnar á Vinnuháskúlanum

## 72 fiskiskip

Harafturat er tað eisini sera torført at útvega sær praktikktíð (siglingartíð) hjá maskinmeistararum/ maskinistum og eisini hjá skiparum/skipsførarum. Talið av føroyskum fiskiskipum, sum eru til fiskiskap, (undantikið útróðarbátar) er í dag bert 72, og tað eru bert 686 fiskimenn (við inntøku oman fyri kr 170.000,- árliga). Um aldarskiftið var talið 97 skip og 1150 fiskimenn. Fari eg enn longur aftur, er broytingin enn størri. Sostatt minkar møguleikin at fáa siglingartíð, ið er krav fyri at fáa góðkent vinnubræv. Kravið er ávikavist 36 mánaða siglingartíð fyri navigatørar og 12 mánaða siglingartíð fyri Maskinmeistarar og maskinistar.

## Broytingar mugu til

Hetta sigur mær at tað mugu broytingar til, um vit sum tjóð framhaldandi skulu varðveita okkara maskinmeistarar og skipsførarar, sum vit við stoltleika í dag kunnu bjóða øllum heiminum (ella sum heimurin eftirspyr).

Persónliga rokni eg ikki við at føroyska fiskimannatalið nakrantíð ferð at økjast aftur og fyri so vítt heldur ikki fiskiskipatalið – heldur øvugt. Hvat hendir við læruplássum, er torført at meta um, tølini sveiggja nógv. Samlað meti eg, at hesi fækkast. Tó vildi eg mett, at ein komandi oljuvinna kann økja hetta tal.

## 12 mánaða siglingartíð

Sum nevnt er kravið at fáa vinnubræv sum maskinmeistari 12 mánaða siglingartíð. Neyðugt verður tí, at skúlin ella aðrir myndugleikar onkursvegna útvega maskinmeistarum siglingartíðina. Føroysku skipini eru fá, og nógv teirra sera smá. Eitt boð er, at avtalur verða gjørdar við útlendsk reiðarí, soleiðis at maskinmeistarar kunnu mynstra sum "overtallig" ella sum "juniormester".

## Mítt boð

Mítt boð um broyting til navigatørarnar er, at vit fáa sett í verk eina aspirantlíknandi skipan. Aspirantskipan merkir "lærupláss", har mann samantvinnar lærutíð (praktikk) og skúla.

Við einari slíkari skipan kunnu vit vænta at náa allar bólkar, tvs, teimum, sum í dag mangla siglingartíð, teimum við miðnámsprógvi og núverandi næmingum við siglingartíð. Soleiðis kunnu vit varðveita okkara fakkunnleika.

At seta upp hesa skipan er ikki trupulleikin í sjálvum sær. Størsti trupulleikin er, at vit hava sera fá skip, sum kunnu hava hesar aspirantar. Tað krevur handilsskip, sum sigla millum lond og arbeiða í internationalum farvatni. Størst parturin av føroyska flotanum er smá fiskiskip, sum ikki lúka krøvini.

## Brúka FAS

Tí er uppskot mítt til loysn, at vit onkursvegna fáa brúkt FAS (Føroysku altjóða skipaskránna) til hetta. Í dag eru uml. 40 skip í hesi skrá. At ein "juniormester" ella ein "aspirantur" var við hvørjum FAS skipi, hevði verið ein framúr møguleiki. Tí er tað mín vón, at føroysku myndugleikarnir onkursvegna fáa inn í avtaluna, at vit hava rætt til nevndu møguleikar.

Sjálvt um fíggjarkreppan herjar runt heimin og eisini her á landi, kann eg staðfesta, at fólk við nevndu útbúgvingum varðveita arbeiði, og at framtíðarútlitini eru góð, eisini tá tað ræður um "makt, pengar og frítíð".




# Skeiðskema 2010

| Nr. | Skeiðnavn | Dagar | DKK | apríl | mai | juni | aug | sept | okt | nov | des |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | ARPA skeið<br>ARPA Automatic Radar Plotting Aids | 4 | 8.900 | | 10 | | 23 | | | 15 | |
| 2 | GOC (Generelt certifikat sum radiooperatørur) Nýtt<br>GOC General Operator Certificate (NEW) | 15 | 14.900 | | | | | | | | |
| 3 | GOC-endurnýggjan<br>GOC General Operatør Certificate, renewal of course | 7 | 7.000 | 26 | | | | | | 22 | |
| 4 | LRC (Avmarkað radioskeið)<br>LRC Long Range Certificate | 7 | 8.900 | | | | | | | | |
| 5 | LRC við Inmarsat<br>LRC Long Range Certificate, with Inmarsat | 8 | 9.950 | | | | | | | | |
| 6 | Tankers Safety serskeið fyri olju- gas- og kemikaliutangakip<br>Tankers Safety, special course for oil-, gas- and chemical tankers | 5 | 6.800 | | | | 16 | | | | |
| 7 | Flutningur av vandamiklum farmi<br>Transport of dangerous goods in dry cargo ships | 3 | 5.400 | 19 | | | | | | 08 | |
| 8 | Eftirútbúgving sum sjúkraviðgeri (Heilsulæra)<br>Supplementary training in medical proficiency | 4 | 7.500 | 24 | | | | 06 | | | |
| 9 | Eftirútbúgving sum sjúkraviðgeri (Heilsulæra) um prógvið er eldri enn 10 ár<br>Supplementary training in medical proficiency When certificate is older than 10 years | 10 | 12.000 | | | | | | | | |
| 10 | ECDIS (elektroniskt sjókort)<br>Course in Elektronic Cart Display Indication System | 4 | 8.900 | | 24 | | | 20 | 25 | | |
| 11 | Endurnýggjan av vinnubrævi<br>Renewal of maritime training certificate | pr. dag | 1.500 | 12 | | | | | | 01 | |
| 12 | SSO-skeið<br>Course for Ship Security Officers | 3 | 5.400 | | | | | 07 | | | |
| 13 | § 16-skeið<br>Working environment §16-course | 3 | 5.800 | | | | | | 18 | | |
| 14 | Ketilpassaraskeið<br>Skeiðið verður 5 fylgjandi fríggjadagar<br>Course as Bolier Tender | 5 | 7.500 | | | | | | 01 | | |
| 15 | Eldsløkking umborð á skipi<br>STCW A-VI/1-2<br>Fire Fighting on board Ships | 3 | 5.650 | 12 26 | 10 31 | 14 | 09 | | 04 18 | 01 15 | 06 |
| 16 | Endurtøku eldsløkking umborð á skipi<br>STCW A-VI/1-2<br>Refresher Course in Fire Fighting | 1 | 2.900 | 08 29 | | 03 | 05 | 09 | 07 | 04 | 09 |
| 17 | Sløkkileiðsla umborð á skipi<br>STCW A-VI/3<br>Advanced Fire fighting | 2 | 4.100 | | | | 19 26 | 02 16 26 30 | | | |
| 18 | Eldsløkking fyri skipsyvirmenn<br>Fire Fighting for Ships Officers | 5 | 9.750 | | 03 | | 16 23 30 | 13 20 27 | | | |
| 19 | STCW A-VI/1-2 & STCW A-VI/3<br>Sløkkiliðsfólk uttan sløkkibil<br>Advanced Fire fighting for Ships Officers | 5 | 8.650 | | | | | | | | |
| 20 | Sløkkiliðsfólk við sløkkibili | 10 | 17.300 | | | | | | 25 | | |
| 21 | Brunaumsjónarmenn | 7 | 12.100 | | | | | | | | |
| 22 | Venjing fyri sløkkilið | 1 | 1.800 | | | | | | | | |
| 23 | Eldsløkking og bjarging í tunlum | 3 | 7.000 | | | | | | | | |
| 24 | Grundleggjandi eldsløkking<br>(Fyri virkir, stovnar og einstaklingar) | 1 | 860 | | | | | | | | |

Vinnuháskúlin treytar sær rætt at avlýsa skeið, um ov fá eru tilmeldað.

Nóatún 7 · FO-100 Tórshavn
Tel 350 250 · Faks 350 251
info@vh.fo · www.vh.fo

VINNUHÁSKÚLIN
CENTRE OF MARITIME STUDIES & ENGINEERING

KREA · TEL 60 80 80

# Tíðindi frá Føroya Skipara- og Navigatørfelag

## Hava samstarvað í 100 ár



*Eyðstein Djurhuus*

Í 1910 varð Norðurlendska Navigatør Kongressin stovna. Klassakampur var høvuðsmálið hjá fakfeløgum tá á døgum. Kongressin avgjørdi beinanvegin at hetta var ikki nakað aðalmál hjá teimum. Tí valdu fleiri av stýrimansforeiningum ikki at vera við, tey fyrstu árini.

Kongressin hevur mest fingist við at bøta um trygdina á sjónum. Eisini hava rammu umstøðurnar hjá sjóvinnuni altíð fingið nógva umrøðu. Kapping frá láglønar londum, var longu tá eitt heitt mál. So kanska er, ikki so nógv broytt hesa øldina kongressin hevur virka. Longu tíðliga sóu menn, at eitt altjóða regulverk innan skipaferðslu var besta trygdin móti órímiligari kapping.

Tankin er at vit sum hoyra til framkomna partin av heiminum, hava tað lættari við at uppfylla høg altjóða krøv, enn skip úr láglønarlondum. Norðurlendsk manningar- og reiðarafeløg er tey sum skunda undir at fáa hert altjóða krøvini til sjóvinnuna. Hendan filosofi er torfør at fáa eyga á her heima hjá okkum. Tað sær út sum, at vit í Føroyum heldur fara eftir lægsta felagsnevnara.

FSN kom við í Navigatørkongressina í 80-num, her fingu vit atgongd til servitan á hægsta støði. Tey mál, sum verða viðgjørd í okkara grannalondum, koma sum oftast nakað seinni á breddan her hjá okkum. Nógvir føroyskir sjómenn sigla við skipum úr hinum norðanlondunum, tí hevur tað stóran týdning, at hava góð viðurskifti við hini norðurlendsku navigatørfeløgini.

Nú 100 ára dagur var hildin, vóru málsetningar fyri framtíðina gjørdir. Feløgini eru samd um at seta ein persón í fast starv hjá Kongressini. Hesin skal samskipa, luttøkuna hjá feløgunum í millumtjóða felagsskapum. FSN hevur higartil ikki luttikið stórvegis í millumtjóða fakfelags arbeiði. Um FAS skipanin gerst ein stór skipaskrá, so fer hetta at forplikta FSN, at verða meira sjónligt í millumtjóða fakfelagsarbeiði.

Eitt jubileumstíðarrit er útgivið nú hátíðardagurin hevur verið. Greinar eru út øllum londunum, Mið og Magn fer at endurgeva hetta tilfar. Hesuferð er Ísland á skránni, og sum øll vita so hevur henda tjóðin stórar avbjóðingar fyri framman.

## Føðingardagar hjá limum okkara

| | | |
|---|---|---|
| Jógvan A. Eliasen | 2. mai 1940 | 70 ár |
| Erlendur Petersen | 2. mai 1950 | 60 ár |
| Jákup E. Joensen | 22. mai 1950 | 60 ár |
| Sigmund Andreasen | 28. mai 1950 | 60 ár |
| Jákup Hammer Gøthe | 4. juli 1950 | 60 ár |
| Eiler Mikkelsen | 5. junoi 1950 | 60 ár |
| Jóan Petur í Soylu | 25. juli 1950 | 60 ár |
| Jon Leivsgarð | 8. mai 1960 | 50 ár |
| Kristjan Karl Eliasen | 2. juli 1960 | 50 ár |
| Súni Eliasen | 6. juli 1960 | 50 ár |
| Jógvan Páll Hammer | 12. juli 1960 | 50 ár |
| Esben Poulsen | 12. juli 1960 | 50 ár |
| Marius J. Sørensen | 22. juli 1960 | 50 ár |
| Heðin Hansen | 25. juli 1960 | 50 ár |
| Martin Thomasen | 4. mai 1970 | 40 ár |
| Niels Poul Holm | 16. juni 1970 | 40 ár |
| Tórhallur Randrup | 23. juni 1970 | 40 ár |
| Knút Høgagarð | 3. juli 1970 | 40 ár |
| John M. Poulsen | 4. juli 1970 | 40 ár |
| Jonhard Einar Johannesen | 21. juli 1970 | 40 ár |

## Brot úr dagbókini hjá Skipara- og Navigatørfelagnum

**5. januar: FSN**
Blaðnevndarfundur

**6. januar: FSN**
Fundur við skipara og stýrimann á Smyrli

**12. januar: MF**
Fundur við Strandferðsluna um sparingar og broytta ferðaætlan

**13. januar FSN**
Samrøða við svenska tíðarritið Sjøfart um innflagging hjá svenskum skipum í FAS skipaninia

**15. januar:**
Fundur við Advokatvirkið um ymisk limamál.

**15. januar:**
Fundur við Thor Shipping

**20. januar: MF**
Fundur við Strandferðsluna og Lønardeildina um staðbundnar avtalur, manningarfeløgini vildu ikki broyta núverandi staðbundnu avtalur.

**21.januar: FSN**
Nevndarfundur hjá FSN, millum annað umrøddu vit nýmótansger av fiskiskipasáttmálanum.

**25.januar: FSN**
Blaðnevndarfundur

**1. februar: Portugali**
Sjóvinnuráðið viðgerð eina kæru, um manningarskjal til ein stóran útróðrarbát

**4. februar: Kongabrúgvin**
Fundur við Lívstrygging

**4. februar Starvsmannafelagið.**
Fundur millum fakfeløgini nú Fasti Gerðarættur hevur ásett at verkføll skulu fráboðast við einara freist.

**8. februar: Fiskimannafelagið**
Manningarfeløgini hittast at tosa um okkara støðu til orðaskifti um at avtaka sjómannafrádráttin og inntøkutrygdina.

**9. februar: Betri Pensjón**
FSN og Betri Pensjón undirskriva eftirlønaravtalu. Limirnir kunnu nú velja millum Lívstrygging og Betri Pensjón. Samlagstryggingin verður tó framvegis hjá Lívstrygging

**10. februar: FSN**
Blaðnevndarfundur

**11. februar: Starvsmannafelagið**
Fakfeløgini tosa saman um Fasta Gerðarættin, fleiri hava hug at siga seg úr Fasta Gerðarættinum.

**12. februar: Mentamálaráðið**
Maritima Útbúgvingarráðið tosar við arbeiðsbólkin sum skrivar eitt álit um framtíðar maritimar útbúgvingar í Føroyum.

**12. februar: FSN**
Søfartens Ledere helur limafund í hølunum hjá FSN. Fleiri enn 40 møttu til fundin, nógv orðaskifti var um sjálvbodnu fráfaringar tilboðini hjá Mærsk Lines. Eisini bleiv nógv tosað um manglandi samskifti millum TAKS og danska Udligningskontoret, fleiri høvdu fingið eykarokning fyri ov nógv útgoldnan rentustudning.
Formaðurin boðaði frá at hann tekur ikki við afturvali á næsta landsfundi. Hann væntaði at tað fór at verða torført at fáa nakra lønarhækking við næstu samráðing. Eisini hevur tað gingið sera striltið við at fáa reiðarar at góðtaka, at tann stóra skattalækkingin í Danmark skal kompenserast í DIS nettolønunum. Her er trupulleikin, at hægstu lønirnar eiga mest í kompensatíón.

**15. februar: Vinnuháskúlin**
Framløgudagur hjá føroyskari fiskivinnugransking

**16. februar: Dómhúsið**
Tvingsilsøla av West Freezer og Venus 1

**18. februar: Vinnuháskúlin**
TYR Shipping Management greiðir frá teirra ætlanum. Nógv fólk frá vinnuni og politisku skipanini vóru møtt upp. Fleiri áhugaverdir fyrilestrar vóru um framtíðarmøguleikar hjá einari føroyskari shipping vinnu.

**22. februar: Fiskimálaráðið**
Fundur í arbeiðsbólkinum um Inntøkutrygd.

**22- 26 februar: Stockholm**
100 ára stovningar hald hjá Norðurlendsku Navigatør Kongressini. Eyðstein, Regin og Ellintur umboðaðu FSN.

**1. mars: FSN**
Blaðnevndarfundur

**5. mars: Fiskimálaráðið**
Fundur í arbeiðsbólkinum um inntøkutrygd

**9. mars: FSN**
Fundur við Jens Wang advokat um eitt sakarmál sum FSN førir

**12. mars: Advokatvirkið**
Semjufundur millum advokatin hjá EIK banka og FSN um semju í málinum, um hýrukrøv fyri Nordic skipini. FSN kundi ikki góðtaka upphæddina sum EIK bjóðaði.

**15. mars: FSN**
Blaðnenvdarfundur

**18. mars Fiskimálaráðið**
Fundur í arbeiðsbólkinum um inntøkutrygd

**22. mars Fiskimálaráðið**
Fiskivinnuráði ummælir uppskot um at fáa lemmatrolarar undir fiskidagaskipanina og broytingar í kunngerðini um garnafiskiskap.

# Tíðindi frá Maskinmeistarafelagnum



*Petur Ove Vesturtún, vm, formaður í Motorpassarafelagnum og Páll Hansen, formaður í Maskinmeistarafelagnum, ynskja hvørjum øðrum tillukku við, at nú eru bæði feløgini løgd saman*

## Motorpassarar eru nú limir

Motorpassarafelagið er nú niðurlagt, og limirnir eru komnir upp í Maskinmeistarafelagið. Á aðalfundinum varð einmælt samtykt, at Motorpassarafelagið og Maskinmeistarafelagið skulu leggja saman.

Áður er samanleggingin eisini samtykt í Motorpassarafelagnum.

Nú er bara eftir at formenninir í báðum feløgunum undirskriva avtaluna um samanlegging. Tað verður í næstu framtíð, tá ið formaðurin í Motorpassarafelagnum kemur aftur av túri.

Hetta merkir, at Motorpassarafelagið kemur upp í Maskinmeistarafelagið við øllum limum sínum og við øllum ognum og skyldum.

Felagið skal framhaldandi eita Maskinmeistarafelagið, og lógirnar hjá Maskinmeistarafelagnum verða eisini galdandi fyri samanlagda felagið. Somuleiðis heldur nevndin í felagnum óbroytt fram av hesi orsøk.

Á aðalfundinum varð upplýst, at tað er avgjørt ikki eitt skuldarbundið Motorpassarafelag, sum nú kemur upp á Maskinmeistarafelagið. Tvørturímóti eiga motorpassararnir fitt av ogn, so fíggjarliga verður ikki talan um nakra byrðu hjá felagnum.

Á næsta aðalfundi í Maskinmeistarafelagnum hava gomlu limirnir í Motorpassarafelagnum sostatt møti- og atkvøðurætt á jøvnum føti við hinar limirnar í felagnum.

Í Mortorpassarafelagnum eru stívliga 40 limir og eftir samanleggingina fer limatalið í Maskinmeistarafelagnum sostatt at tátta í 600 limir.



## Brot úr dagbókini hjá Maskinmeistarafelagnum

**05.01.2010: FSN**
Blaðfundur um fjórðu útgávu av Mið og Magn

**12.01.2010: MF**
Fundur millum Manningarfeløgini innan tað almenna og Strandferðsluna um staðbundnar avtalur.

**13.01.2010: FSN**
Fund við blaðmann úr Svøríki, sum var áhugaður í FAS skipanin, hesin svenskarin skrivaði fyri tvey bløð, eitt svenskt finskt og eisini eitt enskt. Innihaldi í hesum bløðum er maritim viðurskifti.

**15.01.2010: Nevndarfundur**
8 mál á skránni, millum annað Føroya Pelagic í Kollafirði, eftirlønir. rentutryggingarlógin, nøkur limamál og komandi NMF fundur í Tórshavn

**19.01.2010: MF.**
Fund við Offshore Directory Tosa var um ein komandi databanka og kunning innan offshore fyri maskinmeistarar. Grein

**22.01.2010: Vinnuháskúlin.**
Fundur við leiðsluna á skúlanum.

Tosað var millum annað um, at fáa eina skeiðsætlan fyri maskinmeistarar. Tosa bleiv eisini um maskinmeistaraútbúgvingina, bachelorútbúgving og eitt sindur um hølis viðurskifti.

**25.01.2010: FSN**
Blaðfundur eftir meting av fjórðu útgávu av Mið og Magn og tilrættisleggjan av fimta blaðið.

**29.01.2010: MF**
Fundur millum manningarfeløgini innan tað almenna og Strandferðsluna og Lønardeildina um staðbundnar avtalur.

**29.01.2010: MF**
Nevndarfundur
4 mál á skránni, millum annað bleiv tosa um ymisk manningarskjøl, sjóvinnuráðið og brøv til limir.

**01.02.2010: Portugálið**
Fundur í Sjóvinnuráðnum. Til viðgerðar var kæra um manningarskjal.

**04.02.2010: Starvsmannafelagið.**
Fundur millum tey flestu av fakfeløgunum, um fasta gerðarrættin, og avgerðina hjá rættinum um tíðarfreistir.

Maskinmeistarafelagið boðaði frá, at vit vóru sinnaðir at siga sáttmálan upp um fastan gerðarrættin fyri at fáa hann endurskoðaðan. Og vit kundu ikki góðtaka tíðarfreistina tá hettar er nakað sum hevur verið uppi og vent undir sáttmála samráíngum, í práti yvir um borði, nakra ferðir tá vit hava samráðst.

Vit hava ikki avvíst hettar, men kraft % fyri at taka spurningin um tíðar freistir upp.

**09.02.2010: FF**
Fundur millum MF, FSN, og FF um inntøkutrygd skipsfiskimanna og skattafrádrátt hjá sjómonnum.

**12-02-2010: Starvsmannafelagið**
Framhald frá fyrra fundi un fasta gerðarrætt. Starvsmannafelagið boðaði frá, at tey vilja kæra mál um tíðarfreistir til víðkaðan gerðarrætt. Fleiri av teimum feløgunum sum møtt vóru, vóru samd um at siga sáttmálan við fastan gerðarrætt upp.

**19.02.2010: MF**
12 mál á skránni, millum annað komandi aðalfundur Eftirlønar viðurskifti innan FAS og nøkur persónsmál.

**22.02.2010: Fiskimálaráðið**
Arbeiðsbólkurin til at gera tilmæli um inntøkutrygd, hevur sín fimta fund.

**26.02.2010. Betri Pensjón**
Fundur um eftirlønarskipina og eventuelt framtíðar samarbeiðið.

**01.03.2010: FSN**
Blaðfundur um fimtu útgávu av Mið og Magn

**06.03.2010: Hotel Hafnia**
Aðalfundur

## Føðingardagar hjá limum okkara

| | | |
|---|---|---|
| Ingolf Johannesen | 5/3/1950 | 60 ár |
| Jóhannes Hansen | 5/5/1950 | 60 ár |
| Símun Berg Hansen | 5/23/1950 | 60 ár |
| Anders Nedergaard Hansen | 5/23/1950 | 60 ár |
| Hans Egon Jacobsen | 6/10/1950 | 60 ár |
| Dánjal Jákup Højgård | 6/25/1950 | 60 ár |
| Joen Jacob á Fløtunum | 7/24/1950 | 60 ár |
| Piddi Kári Petersen | 5/17/1960 | 50 ár |
| Kaj Anker Joensen | 5/23/1970 | 40 ár |
| Eddie Magnussen | 5/28/1970 | 40 ár |
| Ernst Joensen | 6/1/1970 | 40 ár |
| Sam Vang | 7/10/1970 | 40 ár |
| Tummas Pauli Juul | 7/18/1970 | 40 ár |

# Stutt um TYR Shipping Management

TYR Shipping Management (TSM) er ein ship managment fyritøka. TSM bjóðar eina røð av tænastum til skip, sum krevjast til tess at skipið verður rikið í samsvari við lógir og reglur. TSM bjóðar eisini aðrar tænastur, sum hava við skip at gera, men sum kanska ikki kemur undir dagliga raksturin Tænasturnar umfata:

1. Technical management
   a. Samskifti við myndugleikar og klassa.
   b. Eftirlit og uppfylging av viðlíkahaldi.
   c. Dokk og eftirlit í dokk.
   d. Skráseting av skipum.
2. Umboð fyri útlendsk reiðarí, sum hava skip í FAS.
3. Innkeyp.
4. Fíggjarstýring.
5. ISM.
6. ISPS.
7. Vetting.
8. Crewing .
9. Independent surveyors (Draught survey, gas freeing, cargo surveyors casualties etc…)
10. Tænastur í samband við havarí.
11. Loysa seruppgávur innan logisitkk.
12. Farmaavtalur.
13. Agentar fyri skip.

Høvuðsendamálið við at stovna felagið, er at draga nakrar av tænastunum, sum útlendingar veita føroyskum skipum, heim til Føroya. Ætlanin er eisini at kappast á altjóða marknaðinum, har tænastur møguliga verða seldar til útlendsk skip eisini.

TSM er fyrsta føroyska fyritøkan, sum bjóðar so breitt úrval av tænastum til skip. Áður hava føroyskar tænastur til skip í størstan mun umfatað at rinda lønir til manningina. TSM ætlar at fara víðari og veita vitanartungar tænastur til skip.

Tá talan er um vitanartænastur verður ofta spurt hvaðani arbeiðsfólkið



*Óli Hans Hammer Olsen*

skal koma? Føroyingar, sum hava førleika til at røkja tænasturnar sita nógvir í leiðandi størvum umboða á skipum og í landi hjá nøkrum av heimsins fremstu skipafeløgum. Talan er í størstan mun um maskinmeistarar og navigatørar, sum hava royndir á sjónum. Ætlanin er at bjóða hesum monnum størv at koma heimaftur til. Aðrir førleikar skulu eisini til, fyri at veita munadyggar tænastur. Í tí sambandinum er eitt netverk stovnað, sum kallast shipping.fo. Netverkið umfatar advokatar, grannskoðarar, skipakonsulentar, bókhaldsvirki o.a. Shipping.fo er soleiðis sett saman, at tað til eina og hvørja tíð kann svara øllum spurningum, sum reiðarar seta.

## Marknaðurin

Sum áður nevnt, er lógarkravt, at persónur á landi skal vera knýttur at einum skipi í sambandi við tryggan rakstur. Nógvar aðrar tænastur, sum eisini verða røktar á landi, knýta seg at skiparakstri. Vanligt er, at allar tænasturnar verða lagdar á sama stað. Reiðarí gera sínar egnu teknisku deildir, t.d. Mærsk, meðan onnur reiðarí velja at veita tænasturnar út, t.d. Frontline.

Marknaðurin er skipaeigarar, sum velja at veita tænasturnar út.

Tað finnast nógv shipmanagement feløg. T.d. í Danmørk eru nógvar fyritøkur, sum, taka sær av at veita slíkar tænastur. Tann kendasda er óivað Armada shipping.

Stóra avbjóðingin hjá einum lítlum nýstovnaðum felag, er at gerast kendur á marknaðinum. Hetta letur seg gera, verður farið miðvíst til verka við at gera vart við seg á røttum støðum. Marknaðarføringin umfatar bæði at seta seg beinleiðis í samband við reiðarar og at møta upp á ráðstevnum, har skipaídnaðurin hittist og møguleikar verða kannaðir.

Eiagararnir av TYR Shipping Management eru THOR P/F í Hósvík, Ó. H. H. Olsen Sp/f og CREW.fo Sp/f.



# Navigatørurin í brennideplinum

## Annfinn Garðalíð



**Útbúgving:**
Eg bleiv liðugur við skipara á Vinnuháskúlanum í Tórshavn í juli 2002.

**Verandi starv:**
Sigli sum nú er sum stýrimaður við partrolaranum Fram úr Vestmanna.

**Hjúnafelagi:**
Mariann P. Garðalíð, ergoterapeutur.

**Børn:**
Bárður 20 ár. Johannes 14 ár. Annvør 4 ár

**Besta bók:**
Tað veit eg faktiskt ikki, eg eri eingin lesihestur, men Bíblian sigur og gevur mær nógv.

**Fyrstu ferð til skips:**
Tað var fyrst í 80-unum við síðutrolaranum Tjaldhamar úr Vestmanna. Hendan túrin bleiv ein av manningini fastur í aftaru topprulluni, og misti fleiri fingrar.

**Longsti túrur til skips:**
Tað var við Pelagus. Vit royndu eftir gulllaksi og svartkjafti, frystu í blokk, sigldu so beinleiðis til Holland at selja. Og so beina leið aftur til fiskarí. Onkur túrur kundi vara umleið ein mánað, men oftani komu vit inn á Vestmanna fyri at taka troli upp á land, tí tað var so mikið illa fari, so túrarnir blivu sjáldan langir.

**Hvørjum skipum hevur tú verðið við:**
Sum nevnt Tjaldhamar, og so ein stuttleikatúr saman við pápa; tað var við Gullberg. Í 1983 fór eg sum maður við snellubáti til Íslands við Eldurenni. Í 1995 við Pelagus. Og seinri í 1995 við Vestmenningi sum dekkari og loysti av sum kokkur; tað vóru umleið 3 ár. So havi eg verðið onkrar avloysaratúrar við ávikavist frystitrolaranum Fram, Grønanes, Nornagesti og Nim. Annars havi eg verðið skipari umborð á Garnaskipinum Vesturland í umleið 6 ár og við garnaskipinum Thor í 8 mánaðir.

**Størsta avbjóðingin hjá einum skipara í dag:**
Hvør nýggjur dagur hevur nýggjar avbjóðingar. Men tað at fáa eitt skip litið uppí hendurnar at dríva, er ein stór avbjóðing. Tú skal jú verða har sum fiskurin er, so eg haldi, at ein skipari skal fylgja væl við bæði so og so.
Og tað at selja fiskin um skiparin hevur fingið litið uppí hendurnar, tað haldi eg er eisini ein avbjóðing. Sagt í øðrum orðum, tú má verða á rætta stað til rætta tíma, og selja í røttu løtu, og nær er so tað? Hetta var fyri meg sera mennandi, læruríkt og hartil spennandi.

**Frítíðarítriv:**
Ja, tað er so tað. Jú mær dámar væl at ganga úti í náttúruni, ganga langar túrar og fáa pulsin upp. Annars so hava eg og bróður ein ferðamannabát "Viljin", sum vit gera útferðir við. Tað eru turistar, og leigutúrar av ymiskum slagið runt oyggjarnar. Og at svimja dámar mær væl.

**Bilur:**
Peugeot 307 HDI

**Telda:**
TOSHIBA

**Besti sangur:**
Hetta var straks verri at svara uppá. Mær dámar sera væl country. So Hallur Joensen við sanginum "Kiss ein eingil hvønn morgun", og ella "Giltu ljósakrúnurnar", eg haldi, at teir eru góðir. Og Kriss Krisstofferson , tá hann syngur sangin "WHY ME LORD"; tá lurti eg við andakt, og nógvir tankar fara víða hvar.

**Hvat kann gleða teg í gerandisdegnum:**
Tað er, at familjan hevur tað gott, og hon trívist saman við mær, og ikki minst, at familjan vísir respekt og virðing fyri mær uttan, at hetta skal kunna verða misskilt við respekt, og øvugt sjálvandi.

**Hvat kann øsa teg:**
Bókstavliga tala, hvat kann øsa, uha. Ja - tað er tá okkara fólkavaldu akademikarar tosa niður á sjófólkið, teir tosa sum um vit fáa alla verðina og, at vit eru orsøkin til búskaparkreppuna, sum er her á landi. Ístaðin fyri at síggja, hvussu langt afturútsigld vit sjófólk eru. Tá kunna bæði nakkahár og ryggfjarðar reisa seg. Men konan sigur, at síðani eg fekk tikið gallið eri eg sera avbalanseraður, og ikki til at kenna aftur. So um tú stríðist við sinnalagið, ja so er bara at fáa tikið gallið.

# Stórir møguleikar í frálandavinnuni



## Nú skulu allir føroyingar kunna førleikamennast innan frálandavinnuna.

North Atlantic Offshore Personnel Directory (OPD) er nýggj verkætlan, sum í hesum døgum verður sett í verk. Ætlanin er greið: at skráseta øll fólk í norðuratlantiska økinum, sum kunnu arbeiða í frálandavinnuni. Hetta verður gjørt fyri at byggja eitt grundarlag undir eini førleikamenning og fyrireika arbeiðsmegina til ta lokalu – men ikki minst globalu frálandavinnuna.

Í almenninginum er vanliga fatanin, at oljuvinnan í Føroyum bleiv ikki tað, sum øll høvdu vónað. Veruleikin er, at oljuleiting í føroyska økinum er komin rættiliga stutt. Einans 6 brunnar eru boraðir, og hetta er sera lítið samanborið við til dømis økið beint eystan fyri bretska markið, har 200 brunnar eru boraðir. Ein lokal føroysk oljuvinna er tó ikki fortreytin fyri OPD.

- Føroyska arbeiðsmegin hevur júst teir førleikar, sum altjóða frálandavinnan vil hava. Teir hava prógvini, siglingarroyndir, eru arbeiðssamir og vanir at arbeiða úti í heimi, sigur Dánial Hoydal, stjóri í OPD.

- Tó manglar teimum ofta nøkur ávís skeið og prógv fyri at kunna bjóða seg fram í altjóða frálandavinnuni. Eisini vantar eitt stað at fara fyri at fáa ráðgeving um teirra møguleikar í frálandavinnuni, greiðir hann frá og nevnir eitt dømi um ein mann, sum úr egnum lumma brúkti 400.000 kr. upp á eitt skeið, sum hann helt vera fortreyt fyri at fáa eitt ávíst arbeiði í frálandavinnuni. Tá hann síðani fekk eitt starv, segði arbeiðsgevarin, at tað skeiðið kundi hann fingið frá teimum.

### Netverk

Umframt at vera ein dátugrunnur, skal OPD verða ein miðdepil fyri netverk, vitanarbýti og útbúgving innan frálandavinnuna í norðuratlantiska økinum.

- Frálandavinnan í økinum er so nýggj, at onki netverk er bygt upp enn. Tað hevur verið og verður eitt stórt arbeiði at finna fram til allar áhugabólkar í økinum og skapa eitt netverk. Umframt einstaklingar skal OPD netverkið fevna um granskingarstovnar, útbúgvingarstovnar, almennar stovnar og ikki minst vinnuna.

OPD fer at samskipa skeið og bjóða fram tænastur og ráðgeving og til allar hesar áhugabólkar og skal ætlandi gerast ein vitanardepil í økinum, sum áhugabólkarnir fáa gagn av.



*Møguleikarnir eru stórir. Endamálið við OPD er verða grundarlag undir einum skifti frá minkandi fiskivinnuni til lønandi frálandavinnuni hjá arbeiðsmegini í norðuratlantshavi.*

### Føroyar fyrst

Heimasíðan www.offshore-directory.fo verður í hesum døgum almannakunngjørd í Føroyum. Har kunnu øll skráseta seg – líka frá ófaklærdum til fólk við drúgvum royndum – sum vilja vita meira um teirra møguleikar í frálandavinnuni.

OPD verður fyrst bjóðað fram til føroyingar fyri síðani seinni í ár at taka Grønland og Ísland við í netverkið. Samstarvsfelagar í grannalondunum eru longu komnir uppí. Teir eru fyrst og fremst íslendski Orkustovnurin og Qaasuitsup Kommuna. Qaasuitsup er risastóra kommunan, sum fevnir um alt Útnyrðingsgrønland, har størsta oljuvirksemið verður.

Arbeitt hevur verið við OPD leingi, men eftir at verkætlanin fekk stuðul frá oljufeløgum, kom ferð á. Oljufeløgini Faroe Petroleum, BP, Statoil, Atlantic Petroleum og Sagex Petroleum hava stuðlað verkætlanini fíggjarliga umvegis grunnin til førleikamenning innan oljuvinnuna. Hesin fíggjarligi stuðul hevði avgerðandi týdning fyri, at verkætlanin kundi fremjast.



# Pelagiska kompleksið

*Tekstur: Hans Ellefsen*




Um hugt verður at roknskapartølunum fyri fiskiveiðuna hjá NOTA er umleið helvtin av søluvirðinum hjá føroyska flotanum í tí pelagiska flotanum ella hjá flakatrolarunum. Samstundis hevur nærum alt yvirskotið seinastu árini verið í hesum flotum, tó at einki yvirskot var í nøkrum flota í 2008.

Tað merkir, at helvtin av okkara veiðuvirði avhongur av avtalum vit gera við onnur lond; tá er Barentshavið íroknað. Tí er sera týdningarmikið, at vit kenna alt til, hvussu hesar avtalur kunnu gerast.

## Makrelurin

Seinastu árini hava avtalurnar um teir pelagisku fiskastovnarnir verið undir størri og størri trýsti. Serliga hevur avtalan um makrel fingið eitt skot fyri bógvin, av tí at íslendarar hava fiskað makrel uttan at vera partur av strandalandaavtaluni. Hetta hevur borið til av tí, at makrelurin hevur tikið upp eitt nýtt ferðingarmynstur. Hetta at íslendarar hava fiskað so nógv hevur eisini fingið føroyingar at halda, at vit eiga ein størri part av makrelavtaluni.

Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum hevur sagt, at hann veit ikki um hann fer at lata føroyskar bátar fiska meira makrel enn kvotan fer at geva okkum. Hinvegin kann tað gerast dýrt, um nótabátarnir ikki sleppa at fiska makrelin í norskum sjógvi, tá hann er mest verdur.

Tó vísti tað seg í 2009, at makrelurin næstan ikki kom í norskan sjógv um heystið, og kundi fyri ein part fiskast í føroyskum sjógvi.

## Kompleksið

Harafturat verða aðrar avtalur, sum hesi londini gera, serliga strandalandaavtalan um sild og svartkjaft tiknar við í hendan samanhangin. Tvs. um føroyingar bróta avtaluna um makrel kunnu vit vænta, at tað eisini verður verri at fáa avtalur um hini bæði fiskisløgini. Serliga er neyðugt við atgongd til at fiska sild í norskum sjógvi.

Hesin samanhangurin, sum er ímillum avtalurnar verður kallaður tað pelagiska kompleksið. Tað kann verða rættiliga ringt at vita, hvør strategi er best at velja í hesum sambandi, og hvør avtala er tann besta at gera.

## Hvat skulu vit gera?

Kjak hevur tikið seg upp um avtalan, ið føroyingar gera við russar á hvørjum ári er til fyrimuns fyri okkum ella ei. Nótabátar og Havsbrún halda ikki, at vit skulu gera nakra avtalu, tí tað síggja teir ikki nakran fyrimun í. Á hinari síðuni standa flakatrolarar, sum hava avtaluna sum ein stóran part av teirra livigrundarlagi, og síggja stórar fyrimunir í henni.

## Avtalu síðan 1977

Føroyingar hava gjørt avtalur við russar um sínamillum fiskiskap síðan 1977, tá fiskimarkið varð flutt út á 200 fjórðingar. Hesar avtalur hava verið góðar fyri tað føroyska samfelagið í nógvar mátar heilt fram til 2007. Fyrst tí, at áðrenn tað var tað ríkiligt til av svartkjafti, og tá er tað rættiliga ókeypis at lata hann burtur. Ein annar fyrimunur er, at føroyingar fingu søgulig rættindi útfrá tí russiska fiskiskapinum, tá svartkjafturin varð býttur í 2005. So um russar ikki høvdu fiskað svartkjaft í føroyskum sjógvi øll hesi árini hevði føroyski parturin ikki verið so stórur sum hann bleiv.

## Virðisøking

Nú er tað hent síðan 2008, at samlaða kvotan av svartkjafti er fallin sera nógv, til í dag at vera bert ein fjórðing av tí hon var í 2007. Tann parturin, sum føroysk skip kunnu fiska er minkaður meira enn tað, tí at lutfalsliga er tað vit hava latið russum ikki minkað líka nógv sum tað føroysk skip hava fingið.

Valt varð at gera útrokningar soleiðis at virðisøkingin varð samanlíknað, tvs. inntøkurnar minus útreiðslur til olju, proviant og reiðskap.

Dømið er frá 2009 tá føroyingar lótu 100 tTons av svartkjafti og 12,3 tTons av makreli, fyri hetta fingu føroyingar 11,9 tTons av toski og 1,52 tTons av hýsu. Her varð mett, at vit kundu fingið eini 114 mió. kr. í eyka virðisøking, um eingin avtala varð gjørd við russar, her er Havsbrún partvís tikið við og ásett varð, at makrelurin skal fiskast í føroyskum sjógvi til ein lægri prís.

## Hvussu nógv er avtalan verd

Á hinari síðuni varð eisini kannað, hvussu nógv avtalan við russar var verd fyri føroyingar út frá fiskiskapinum í Barenthavinum. Her varð komið til at virðisøkingin var um 66 mió. kr. í 2009. Sostatt lótu vit meira enn vit fingu í 2009.

Ein annar spurningur er, hvussu russar síggja avtaluna við føroyingar. Her er spurningurin, hvussu nógv virði teir seta á svartkjaftin.

Við teimum metingunum, sum vinnulívsfólk hava í Føroyum varð mett, at russar síggja eitt virði svarandi til 194 mió. kr. í virðisøking, sum er munandi meira enn tær 66 mió. kr. vit meta vit fáa frá russum.

Samlað kann sigast at avtalan fyri 2009 ikki var so góð fyri føroyska samfelagið, og var tað millum annað tí, at toskaprísurin var lágur í 2009, og helst eisini tí, at føroyingar higartil ikki hava havt tørv á at seta so høgan prís á svartkjaftin, tá ríkiligt hevur verið til av honum.

# MSC-góðkenningin av norðhavssild

Vit eru stak væl nøgd við, at vit hava fingið góðkenningina upp á pláss, og at vit hava gjørt hetta eftir bara níggju mánaðum.

Tað sigur Jógvan Jespersen, stjóri hjá felagnum Nótaskip, við heimasíðuna www.fishnewseu.com sum í gjár skrivaði um, at felagið nú er "sertifiserað" av MSC fyri burðardygga sildaveiðu.

Jógvan Jespersen leggur afturat, at tað hevur stóran týdning fyri felagið, at veiðan framhaldandi verður burðardygg, tí hetta er leiðin fram.

Tað er av ovurstórum týdningi fyri okkum, at fiskastovnarnir framhaldandi eru burðardyggir. Marknaðurin fyri góðkendari burðardyggari veiðu eru stórir og í vøkstri, og vit gleða okkum til møguleikan at selja okkara góðkendu veiðu, sigur hann við heimasíðuna.

Eisini økisstjórin hjá MSC fyri Norðurevropa fegnast, og hann sigur, at góðkenningin váttar, at føroyski sildafiskiskapurin er væl skipaður, eisini við atliti til framtíðina.



Fyri MSC er tað ein stórur heiður, at ein so sterk fiskivinnutjóð, kemur upp í vaksandi bólkin við MSC-góðkendum fiskiskapi. Eg eri vísir í, at keyparar kring knøttin vilja hava føroyskan norðhavssild, sum er veidd burðardygt, og eg eri eisini vísur í, at føroysk fiskivinna framhaldandi fer at veita íblástur til aðrar fiskivinnu í Norðuratlantshavi, sigur Camiel Derish.




## Vælkomin til Betri pensjón

Betri pensjón ynskir Føroya Skipara- og Navigatørfelag og limum tess vælkomnum. Vit veita eina gjøgnumskygda eftirlønar- og lívstryggingarskipan, sum tryggjar framhaldandi vælferð, tá ið farið verður frá fyri aldur, ella um okkurt óvæntað hendir áðrenn eftirlønaraldur. Meira fæst at vita við at ringja til okkum á tel 345 700 ella vitja www.betri.fo

www.betri.fo - tel 345 700

Betri pensjón